Danskernes Historie Online

Danske Slægtsforskeres Bibliotek

Dette værk er downloadet fra Danskernes Historie Online

Danskernes Historie Online er Danmarks største digitaliseringsprojekt af litteratur inden for emner som personalhistorie, lokalhistorie og slægtsforskning. Biblioteket hører under den almennyttige forening Danske Slægtsforskere. Vi bevarer vores fælles kulturarv, digitaliserer den og stiller den til rådighed for alle interesserede.

Støt Danskernes Historie Online - Bliv sponsor
Som sponsor i biblioteket opnår du en række fordele. Læs mere om fordele og sponsorat her: https://slaegtsbibliotek.dk/sponsorat

Ophavsret
Biblioteket indeholder værker både med og uden ophavsret. For værker, som er omfattet af ophavsret, må PDF-filen kun benyttes til personligt brug.

Links
Slægtsforskernes Bibliotek: https://slaegtsbibliotek.dk
Danske Slægtsforskere: https://slaegt.dk

Ársrit

FØROYA STUDENTASKÚLI
og HF-skeið

40 ár

1937 - 1977

Innihaldsyvirlit

Síða

3: Titulsíða
4: Skrivstovutíðir og telefonir
5: Fororð
6- 14: »Boð og Birting« Kantata eftir Karsten Hoydal
15- 16: Myndir av Føroya Studnetaskúla gjøgnum tiðirnar
17: Mynd av studentunum frá 1942
18: Mynd av studentunum frá 1946
18: Mynd av studentunum frá 1960
20- 22: Minningarorð um Christian Haraldsen
23- 27: Nøvn og myndir av studentunum frá 1975
28: Nøvn og mynd av realistunum frá 1975
29- 31: Nøvn og mynd av studentunum frá 1976
32: Nøvn og mynd av realistunum frá 1976
33- 34: Nøvn og mynd av HF-unum úr Hoydølum 1976
35: Nøvn og mynd av HF-unum úr Klaksvík 1976
36: Nøvn og mynd av HF-unum úr Suðuroy 1976
37- 40: Nøvnini á næmingunum í studentadeildini 1. mai 1977
41- 42: Nøvnini á næmingunum á HF-deildini í Hoydølum 1. mai '377
43: Nøvnini á næmingunum á HF-deildini í Klaksvik 1. mai 1977
44- 45: Nøvnini á næmingunum á HF-deildini í Suðuroy
46- 47: Studentaskúlastruktururin
48- 49: Møtiskylda
50- 52: Kanning gjørd í Hoydølum av, hvussu nógv næmingarnir nyta í peningi til bøkur
53: Tú kanst velja russiskt
54: Ferð til Sovjet-samveldið
55- 56: Spælimenninir í Hoydølum
57- 69: Bóklingur við upplysingum um HF-skeiðið í Føroyum
70- 71: Spanskt sum vallærugrein á HF í Hoydølum
72: Kunngerð um vallærugreinina Fiskivinna á HF-skeiðinum í Føroyum
72- 73: HF-næmingar læra um føroyska fiskivinnu
74: Fyrsta prógv í Fiskivinnu tikið á Tvøroyrar HF-skeiði
75: Fiskivinnunæmingar í Klaksvík á kanningarferð við Jens Chr. Svabo mai 1977
76: Tey føroysku stílaevnini 1977
77- 83: Greinir, sum vóru hjálagdar stílaevnunum
84: Myndir frá pisu-fundinum
85- 96: Løgtinglóg um Føroya Studentaskúla og HF-skeið
97: Lærararnir á deildini í Hoydølum
98: Myndir av summum lærarum í Hoydølum
99: Lærararnir á deildunum í Klaksvík og í Suðuroy
100: Myndir av summum lærarum í Klaksvík
101: Week-endfundur í Suðuroy og útferð til Suðuroyar
102-103: Myndir frá útferðini til Suðuroyar.

DAGBLADIÐ

Ársrit

FØROYA STUDENTASKÚLI
og HF-skeið

40 ár

1937 - 1977

Føroya Studentaskúli og H.F.-skeið

1975/76 og 1976/77

Arnbjørn Mortensen
rektari



lagt til rættis:

Gunvør Hoydal

Prent: pf. Dagblaðið

Tórshavn 1977

Føroya Studentaskúli og HF-skeið
Hoydalar - 3800 Tórshavn

Rektari: Arnbjørn Mortensen.
Er at hitta mánadag til fríggjadag kl. 9-10.
Annars eftir avtalu, tlf. 12973.

HF-lestrarvegleiðarar: Gunvør Hoydal og Hans Jákup Debes.
Eru at hitta á tlf. 12972 ella 12973.

Umsitingarleiðari: Jákup í Gerðinum, tlf. 12973.

Lærarastovan: tlf. 12972.

Skúlatænari: Nikal Thomsen tlf. 13474.

Kostdeildin Hoydalar
3800 Tórshavn

Fyristøðumaður: Ásmund Johannesen, tlf. 13373.

Kostlærarar: Annfinnur Skaale tlf. 13772
André Niclasen tlf. 12170

Kokkur: Hans Jac. Dam Jacobsen tlf. 13771

Kostnæmingar: Dreingir, tlf. 11822
Gentur, tlf. 11870

HF-Klakksvík
3870 Klakksvík

Umsitingar- og lestrarvegleiðari: Johnny Thomsen, tlf. 56412

HF-Suðuroy
3880 Tvøroyri

Umsitingar- og lestrarvegleiðari: Jóannes Dalsgaard
Tlf. Tvøroyri 71578, tlf. Vágur 73622

FORORÐ

Tann 1. september í ár eru tað 40 ár síðan Føroya Studentaskúli fór undir undirvísingina. Í 1939 vórðu teir fyrstu studentarnir og teir fyrstu preliminaristarnir klaktir. Hvørt ár síðani hevur skúlin klakt studentar og preliminaristar, uttan í 1961, tá ið skúlin broyttist frá at hava verið 2-ára studentaskeið til at vera 3-ára studentaskúli og preliminerskúlin frá at vera 2-ára skeið gjørdist 3-ára realskúli.

Í ársfrágreiðingini í ár hava vit, tí skúlin hevur 40-áradag, prentað »Boð og Birting«, sum er ein kantata, ið Karsten Hoydal yrkti, tá Føroya Studentaskúli í 1965 fekk tann nýggja skúlan í Hoydølum, og tað gamla sanatoriið varð umgjørt til kostdeild hjá skúlanum.

Á skúlanum eru enn fólk, sum vóru við, tá hann byrjaði, tað eru Erik Petersen, lektor, sum var ein av stovnarum skúlans, og Aksel Tórgarð, prestur, sum varð preliminaristur á tí fyrsta holdinum, ið var klakt. Teir eru báðir lærarir við skúlan.

1. setptember í ár verður eitt hátíðarhald fyri næmingunum á skúlanum og veitsla fyri fyrrverandi og núverandi lærarum og starvsfólki á skúlanum. Tær røður, sum verða hildnar koma møguliga í næstu ársfrágreiðing.

Fyri tveimum árum síðani kom ein stór ársfrágreiðing frá Føroya Studentaskúla og HF-skeiði, av tí at HF var nýstovnað tá. Tann ársfrágreiðingin inniheldur greinir og upplýsingar um Føroya Studentaskúla frá hann byrjaði í 1937 og til 1975, og tí verður hetta ikki tikið upp aftur í hesari frágreiðingini. Um fólk hava áhuga fyri at lesa um søgu skúlans, kann hendan ársfrágreiðing 1975 fáast í bókhandlunum ella við at venda sær til skúlan.

Vit kunnu nevna nakrar greinir, sum standa í tí:
Grein eftir Thomas Nygaard: »Hin hægri skúlin í Føroyum«.
Grein um Thomas Nygaard, eftir Arnbjørn Mortensen.
»Yvirlit yvir Studentaskúlasøguna« eftir Petur Martin Rasmussen og Arnbjørn Mortensen.
Listi yvir allar studentarnar frá 1939 til 1974.
Listi yvir fyrrverandi og núverandi lærarar.
Myndir av studentunum frá 1947, 1955 og 1974.
»Søgan hjá næmingafelagnum«, eftir Hanus Samuelsen og listi yvir formenn í næmingafelagnum 1938-1968.
»Søgan hjá lærararáðnum«.
og annað.

Í hesi ársfrágreiðing hava vit sett myndir av studentunum frá 1942, 1948 og 1960, sum var tað seinasta árið, studentaskeið var, og í teimum komandi ársfrágreiðinunum tara vit at seta myndir av øðrum studentaárgangum.

G.H.

Bod og Birting

KANTATA *eftir* KARSTEN HOYDAL

Á hesum staði, vit nú eru stødd,
var søttin harða dagsins tunga byrða,
her gingu møður, børn og fedrar rødd
og royndu evstu vón um lív *at* hirða.

Her andi bleikt og fáligt lívsins log,
óskepna stardi út úr hvørjum eyga,
her følnaði og fórst, – mangt hugans flog
varð løstað, lamt av sút og sorg og deyða.

Á hesum vali, har so mangur fall,
nú fylkjast unglingar á vaktarhaldi,
at búgva seg til andans høga kall,
ið verja er mót deyðans myrka valdi.

Tí ongantíð má gloymast deyðans vald, –
alt sjúkt, sum støðugt sál og kropp vil granda,
við mekt og mæti reka vit í hald
og mana niður myrkur sótt og vanda. –

At fata tørv og tíðartekin gløgt
til tað skal lívið her og læran eggja,
at rekja upp í sinninum alt fløkt,
teim leiðum fylgja, skil og mentir leggja.

Um vit í stríði standa ódnarnátt,
og hatur hóttir, hungur, svørð og eldur,
má hjartað eiga ment og grøðimátt
at loysa hugans afturbyrgdu keldur.

Í royndum stimbrað, fróð í ráðagerð
um hetta staðið vit nú sláa garðar,
at vaksið fær alt frískt og fjølgast her
so leingi sjógvur fløðir og hann fjarar.

Vegaðu gøtur teir vitru menn
hugaheims vegleysa landi,
gudrøknar sálir, verðsligir menn,
sami var ylheiti andi —
ódnarhugur í øldartal
fór um so víðar grundir,
leitaði framá og vardi væl,
at ei gróðu gøturnar undir.

Sálin støðugt í kvøl og trongd
søkir hitt rætta og sanna,
roynir seg sjálva og stjørnugongd,
havdýpsins loynd at kanna,
fær ikki náðir á síni ferð,
so leingi sum fjøld av myndum
er ikki greind og opinber,
men hølist í myrkri og blindum.

Men, tá ið ríkir níðingsøld,
støðið tað undan ryður,
orð leika leys so hørð og køld,
sannroyndir bundnar niður,
tá veldst um vitskuna, nær og hvar
at skilja ósatt frá sonnum,
at geva órætti aftursvar
og at dugna neyðstøddum monnum. –

Ymsir av lyndi og ættarlag
unglingar her komnir saman
stundandi hóma ein nýggjan dag,
lýsir so vónrík glæman, –
stigin á leiðini fyrstu spor,
búnast skal hugur og blóma,
beina í brøðralag verk og orð
Føroyum til framburðs og sóma.



Resitativ til kennara at bera fram:

Eygu skína sum stjørnur
beint framman fyri mær.
Á hvørji andans veldigu grúgvu
kyknaðu hesir neistar?

Á, mannaandlit!
Ríka og gátuføra land!
Hómi eg langar leiðir,
ófatiliga drúgvar fyrireikingar,
áðrenn tú vart til,
áðrenn eygu vórðu birt,
brosaðu móti mær, –
oyru lýddu á meg,
loftaðu orðum mínum, –
áðrenn kensluborið bragd
– kvikt sum hvirla –
segði frá sorg ella gleði. –

Stundandi eygu
beint framman fyri mær,
stara inn í andlit mítt,
vaka yvir vørrum mínum og brøgdum.

Sjónhald hjá flokki av ungum
standi eg mangan ivingarsamur,
kenni meg so einsamallan,
beran og óvardan. –
Gævi at altíð orð míni
megu falla tykkum eins væl við
og blómurnar, tit hentaðu á bønum.

Gævi hugur mín má ongantíð torna,
men áverk mítt vella sum keldan úr fjalli
við farvegi grønum
bæði summar og vetur.

Gævi eg má ikki benda og boyggja
men lagaliga beina stremban tykkara,
støðugt víðka um sjónarringin,
vandin og við skili
byggja støði saman við tykkum,
sum tit skulu vaksa og mennast á,
so at tit missa tykkum ikki burtur,
heldur ikki bara blundandi
fylgja greiddum gøtum.

Gævi orð míni
– altíð livandi og ráðagóð –
megu loysast á vísdóms-havi,
bróta av vørrum mínum,
skola mót strondunum
í tykkara lurtandi oyrum.

Ljósið frá lívgaðum hugum,
gleðibrosið í mannaeygum
veri mær lív og leiðvísi.

Her løgdu frægir inn av nýggjum,
teir gjørdu garðar, reistu búgv,
hjá teim, sum upp úr nýggjum brutu,
tað stóð um tolni, stóð um trúgv.

Í einsemi teir bygdu landið,
og tíðan verk varð illa lønt,
tann gleðin untist ikki mongum
at síggja gerðið fagurtgrønt.

Men tú, sum arvar dyrkað lendi,
minst til hvør grønur teigur er
ein ogn, sum lívið í tær eigur,
tað veldst um teg, um bøur ber.



Landið, eg bar við mær inn um skúlagátt,
tað livnaði og vaks í mínum huga
tey fyrstu ár, tá bæði stórt og smátt
var fyri eygað undurverk at skoða,
tá átti grótið lív og tinnuglóð,
ein stjørnuglæma stóð úr hvørjum broti,
mín sál var gróðrarmikil, kvæm og góð,
so fríð og glað sum grønur keldutroti.

Landið! Fjøll og strendur ber og veðurbrýnd
og líðir, dalar við so ljósum yndi,
og fólkið, – fjøld av ættarliðum týnd
á tíðarhavi – skapaðu mítt lyndi,
á hesum lendi gróðursett mín sál
skal menna seg og mátt úr bókum súgva,
í lívsins bjargalendi søkja mál
so djarvt sum orð og mannahugsan flúgva.

Havið, eg bar við mær inn um skúlagátt,
tað hav so víða fløtur sínar breiðir,
á sveimi hugur bæði dag og nátt
við teim, sum fóru fjarar skipaleiðir.
Er land mítt lítið, so er verðin stór,
og veking elva havsins løg og sangir,
ein rødd av høvunum at hjarta fór,
gav míni stóru langtan sterkar veingir.

Lívið! Dýra undur, eg var lutur av,
eitt ævinleikaboð av magn' og anda,
sum skelvur gjøgnum loft og jørð og hav
við ljósi, myrkri, vøkstri og við vanda, –
tað stutta bil, tú streymar gjøgnum meg,
eyðmjúkur hugur mín skal opin vera,
í skapninginum øllum tekkja teg
og tær í verki sátt og sømdir bera.

Træskurðir eftir Zacharias Heinesen



Mynd 1

Myndir av Føroya Studentaskúla gjøgnum tíðirnar



Mynd 1
»V.B.V.»-húsini á Skansavegi, har skúlin var frá 1937 til 1962.

Mynd 2
Soleiðis sá út í Hoydølum í 1935

Mynd 2



Mynd 3
Strikumynd av sanatoriinum

Mynd 4
Skúlin og umhvørvið í 1975



Læraarnir: Thomas Nygaard
Jens E. Bergstedt
Christian Haraldsen
Niels Ladegaard Petersen

1942

Daniel Jacob Bærentsen, Jonna Kristine Hansen, Demmus Hentze, Inga Juul, Daniel Magnussen, Arnbjørn Marne Mortensen, Eli Nolsøe, Mortan Vilhelm Nolsøe, Peter Petersen, Peter Arne Rein, Eyðun Sjúrður Winther, Poul Fritz Jacobsen.

Lærararnir: Christian Haraldsen
Niels Ladegaard Petersen
Thomas Nygaard
Jens E. Bergstedt
Erik Petersen

1946

Thomas Napoleon Djurhuus, Verner Leo Mogens Egholm, Hans L. Vang Hansen, Jørgen Hansen, Jona E. F. Henriksen, Johilda Fanny Joensen, Sofus G. K. Joensen, Eyðálvur Kristiansen, Anna Elisa Mortensen, Johan Christian Nielsen, Johan Andreas Nolsøe, Joen Arne Rôin, Hans S. C. Thomsen.

1960

Jórun Abrahamsen, Hanus Andreasen, Turið Paula Christiansen, Jóanes á Mølini Dalsgaard, J. J. F. Georg Egholm, Jóan Petur Gregoriussen, Oddvør S. K. Hovgaard, Elin Súsanna Jacobsen, Lív A. S. S. Joensen, Páll Johansen, Maria E. Krossteig, André L. P. Niclasen, Sigga Poulsen, Lars K. F. Reimers, Karen Stærmose, Anna Jóhanna Thomsen, Johan Nielsen, Barbara Thomsen, Óluva Absalonsen, Óli Sofus Bech, Jóhanna Margretha Matras í Buð, Jákup Magnus Danielsen, Bjarni Hansen, Ole Edvard Heinesen, Anna Turið Holm, Ø ssur Dam Jacobsen, Sofus Joensen, Magni Lómstein, Árni Olafsson, Odmar Færø Olsen, Eyvind Mortan Veihe.

Lærararnir: Thomas Nygaard
Christian Haraldsen
Sofus Joensen
Andrias Højgaard
Arnbjørn Mortensen
Erik Petersen

Minningarorð um

CHRISTIAN HARALDSEN

Sunnudagin 25. juli 1976 andaðist Christian Haraldsen, fyrrverandi lektor, eitt tíðarskeið eisini fyribilssettur rektari á Føroya Studentaskúla. Við honum er farin ein av okkara mætu skúlamonnum, ið sjálvur triðji uttan stórvegis hóvasták í 1937 fekk sett á stovn Studenta- og preliminerskeið Føroya Løgtings og sostatt var við til at bróta nýggja slóð í skúlaskapi okkara.

Nógvir eru teir næmingar, hann hevur havt gjøgnum árini, og fáir munnu teir vera, ið ikki minnast hann við gleði og takksemi. Íðin og nærlagdur sum hann var, eirdi hann ongantíð sær sjálvum, tá ið tað galt næminganna vælferð og kunnleika og skúlans framgongd í heila tikið. Hann fírdi ongantíð fyri, um neyðugt at biða næmingar koma heim til hús hjá sær at fáa okkurt gjølligari frágreitt, sum hann sá kundi falla onkrum tungt í lærugreinum hansara týskt og franskt. Eldri næmingar minnast uttan iva, hvussu hann sunnumorgnar áðrenn kirkjutíð fekk okkum at koma niðan í realskúlan í Havn, har studentaskúlin húsaðist seinrapartarnar frá kl. 15 - 21, leygardag kl. 15 - 18.30 millum 1937 og 1946, at skriva týskan stíl. Vit kundu mangan halda tað vera nóg so nógv avgjørt aftan á drúgva arbeiðsviku at fara aftur í skúla frá kl. 8 til 10 sunnumorgun til skrivligar roynd í týskum, men tað var ikki at tala um, vit møttu upp, vit skiltu, tað mundi vera fyri neyðini, tí á einum 2-ára studentaskeiði skal tað sama náast og lærast sum á einum 3-ára studentaskúla, og Christian Haraldsen lærdi okkum at

leggja doyin á at fáa sum mest burtur úr knappari tíð; hann legði sostatt byrðar á okkum, men vit skiltu eisini, og ikki minst seinni, at hann bar tyngstu byrðina sjálvur. Tað vóru altíð skúlin og næmingarnir fram um alt, kanska meira enn gott var fyri hann sjálvan og hansara húski. — Hann var annars altíð væl fyrireikaður til sínar tímar. Sínum lærugreinum týskum og fronskum hevði hann suverænt vald á, men hjá einum góðum lærara er hetta ikki nóg mikið, hann skal eisini vita gjølliga, hvørjum lærdómsstigi, næmingurin er á, og hvørjar gávur hann hevur, so hann hvørki hevur ov nógv ella ov lítið. Hetta kendi Christian Haraldsen til fulnar, og hann dugdi at leggja sínar tímar soleiðis til rættis, at hvør, sum fylgdi við, kundi fáa nakað burturúr. Um tílíkar livandi og dynamiskar persónligheitir ganga ofta stuttligar søgur. Ein er, at Haraldsen kundi vera so upptikin av síni fyrireiking til ein tíma, at hann byrjaði at undirvísa úti á gongini og so ikki gáðaði eftir, hvørja stovu, hann fór inn í, og so kundi tað vera ein heilt skeivur flokkur, ið koma at byrja tíman við týskum ella fronskum, meðan hann kanska skuldi hava matematikk!

Christian Haraldsen var elduvíkingur, ein av átta systkjum. 19 ára gamal fór hann á lærараskúlan í Havn og tók haðani lærараprógv í 1926, hann hevði sostatt 50-ára minningardag sum lærari í juni í ár. Í 1926-27 var hann hjálparlærari í Kvívík og í Oyndarfirði. Tá fór hann niður á Akademisk Kursus í Keypmannahavn, haðani hann tók studentsprógv í 1929. Hann fór so á universitetið í Keypmannahavn at lesa týskt og franskt og gjørdist cand. mag. í hesum lærugreinum í 1937. Á lestrarferðum var hann í Fraklandi (universitetið í Nancy) í 1932 og í Belgiu í 1935, umframt seinri, í 1957, á Sorbonne og í Gøttingen. Hann var eisini formaður í føroyska studentafelagnum í Keypmannahavn 1932-33. Aftan á embætisprógvtøkuna í 1937 var boð eftir honum at koma heimaftur at fara undir tað nýggja studenta- og preliminerskeiðið saman við Thomas Nygaard og Erik Petersen — næmingar í seinru árum plagdu tala um teir tríggjar »veteranarnar«, sum sostatt nú bert tann eini er eftir av.

Studentaskúlin var sum nevnt aðalmálið og lívsuppgávan hjá Christian Haraldsen.

Í 1960, tá ið rektarastarvið gjørdist leyst, varð hann settur sum fyribils rektari, men vildi ikki søkja starvið, sum hann sat í til 1963.

Hann fór frá við eftirløn í 1974, 70-ára gamal; hann kundi lagt frá sær fyrr, men læraratrot gjørdi, at vit ikki kundu vera hann fyriuttan, og hann aftraði seg ikki, hóast hann ikki altíð livdi so væl. Eisini aftan á at hann var farin frá livdi hann við í skúlans arbeiði, ja, var eisini vikarur eitt skifti í sínum egna starvi, og so seint sum í mai-juni í ár var hann eftiransari til ta skrivligu prógvtøkuna og var við tann seinasta skúladagin, áðrenn vit fóru í summarfrí, tann 25. juni; ein mánaða seinri er hann farin.

Men Christian Haraldsen hevði eisini onnur áhugamál, livandi og virkisfúsur sum hann var. Hann var limur í stjórn Føroya Fólkaháskúla síðan 1942 og formaður síðan 1953 til nú, hann andaðist. Hann var eisini, undantikið eitt stutt

skifti, formaður fyri Føroya Keypssamtøku frá hon varð stovnað í 1952 og fram til 1967.

Christian Haraldsen var bæði sum lærari og annars eitt fryntligt og dámligt menniskja. Vit mongu, ið høvdu ta eydnu at kenna henda mann, drýpa høvur í virðing fyri hansara minni, og størstu samkenslu hava vit við konu hansara og synum.

Arnbjørn Mortensen

STUDENTARNIR 1975

Málslig deild

Jákup Andreasen, Klaksvík, S
Finnbogi Arge, Tórshavn, S
Ann-Mari Dam, Tórshavn, N
Helena Dam, Tórshavn, N
Marita Dam, Tórshavn, N
Guðny Dalsgaard, Tórshavn, N
Beinta Danielsen, Tórshavn, N
Kirsten Didriksen, Tórshavn, S
Anna Maria Fossá, Tórshavn, N
Jacoba Funding, Funningi, N
Boði Godtfred, Vági, S
Hanna Elina Hansen, Saltangará, N
Súsanna Hammer, Kollafirði, N
Noomi Hansen, Tórshavn, S
Tóra Haraldsen, Tórshavn, S
Óluva Isaksen, Tórshavn, N
Mass Ingi Jensen, Tórshavn, N
Bernhardina Joensen, Klaksvík, N
Súsanna Joensen, Klaksvík, N
Unn Joensen, Tórshavn, N
Dánjal Jákup Jørgensen, Miðvági, N
Marjun Berg Olsen, Tórshavn, N
Kristin Petur U. Knudsen, Klaksvík, S
Kristin Lamhauge, Tórshavn, N
Astrid Madsen, Skálavík, N
Elin Michelsen, Tórshavn, N
Ida Mikkelsen, Tórshavn, S
Åse Mikkelsen, Vági, S
Gunnvør Nicolajsen, Tórshavn, S
Elinor Nolsøe, Sørvági, N
Janus Norðberg, Tórshavn, S
Heri Olsen, Kunoy, S
Marjun Patursson, Kirkjubø, S
Sunneva Petersen, Vestmanna, N
Rudolf Poulsen, Tórshavn, S
Martha Restorff, Tórshavn, N
Gunnvá Róa, Gjógv, S
Elisabeth Samuelsen, Klaksvík, S
Jóan Hendrik Samuelsen, Klaksvík, S
Judi Schrøter, Hvalba, N
Dagmar Andrea Svabo, Miðvági, N
Beatrice Ann Thomas, Tórshavn, N
Birita Weihe, Klaksvík, N
Erla Zachariassen, Vestmanna, N
Jóhanna Zachariassen, Tórshavn, N
Sámal á Vágalíð, Miðvági, N

3.a



3.b



3.y

Matematisk deild

Jens Andreassen, Tórshavn, F
Michael Arnskov, Tórshavn, F
Páll Beder, Fuglafirði, F
Esmar Berg, Hvalba, F
Sólfríða Christiansen, Tórshavn, N
Leivur Clementsen, Elduvík, N
Marius Dam, Tórshavn, N
Eyðfinn Didriksen, Tórshavn, N
Ingvard Fjallstein, Leirvík, F
Stein Fossá, Tórshavn, F
Ásmundur Guðjónsson, Klaksvík, N
Jóannes Hansen, Klaksvík, S
Poul Magnussen, Vági, N
Jakku Heinsen, Kunoy, F
Bjørn á Heygum, Vestmanna, S
Volmar Højgaard, Rituvík, F
Richard Jacobsen, Klaksvík, F
Jógvan Á. Jespersen, Tórshavn, S
Kristian Emil Joensen, Lamba, F
Eyðbjørg Dalsgaard, Tórshavn, N
Tordis Joensen, Kvívík, F
Hans Birgir Johannesen, Tórshavn, S
Olaf Kruse, Eiði, F
Poul Hansen, Tórshavn, N
Torbjørn Mikkelsen, Tórshavn, F
Ásbjørn Mikkelsen, Skála, F
Herluf Mortensen, Sørvági, F
Jens Mortan Mortensen, Vestmanna, F
Per Nicolajsen, Tórshavn, S
Ebba Petersen, Tvøroyri, N
Suni Petersen, Tórshavn, F
Sigmund Poulsen, Klaksvík, N
Kári Purkhús, Klaksvík, N
Sámal Ravnsfjall, Miðvági, S
Alexander Samuelsen, Tórshavn, F
Bjarti Thomsen, Klaksvík, F
Andras Skálum, Sørvági, N

Realprógv 1975

Ingrid Bærentsen, Kaldbaksbotnur
Kristina Christiansen, Kollafjørður
Heri Dam, Tórshavn
Gunnar Hansen, Nólsoy
Inga Maria í Hoyvík, Hoyvík
Hanus Jensen, Skúvoy
Eyðsvein Joensen, Gjógv
Anna Johannesen, Hoydalar
Jóhan Petur Samuelsen, Tórshavn
Anna Rúna Samuelsen, Kollafjørður
Ingolf Samuelsen, Kollafjørður

STUDENTARNIR 1976

Málslig deild

Símun Andreassen, Strendur
Berghild Berg, Sandvík
Áki Bertholdsen, Vágur
Randi Biskupstøð, Klaksvík
Elsebeth Dahl, Vestmanna
Nicolina Dahl, Klaksvík
Tummas í Dali, Tórshavn
Jóhanna Danielsen, Skála
Sunnvør Danielsen, Nes
Agnas á Dul, Tórshavn
Kirsten Eliassen, Fuglafjørður
Olaf Ellingsgaard, Tórshavn
Margit Frisdal, Tórshavn
Rannveig Hovgaard, Sandvík
Kristinbjørg Høgnesen, Klaksvík
Jana Højgaard, Runavík
Jensia Højgaard, Tórshavn
Berghild Jacobsen, Tórshavn
Katrin Jacobsen, Tórshavn
Karin Jacobsen, Vági
Osvald Jacobsen, Funningur
Sigrun Jacobsen, Tórshavn
Jógvan í Jógvanstovu, Leirvík
Hans Andrias Joensen, Vestmanna
Julianna Joensen, Sandur
Petur Joensen, Klaksvík
Ása Johannesen, Tórshavn
Poula Johansen, Tórshavn
Jütta Svabo Jørgensen, Miðvágur
Tróndur Leivsson, Hoydalar
Vár Michelsen, Tórshavn
Michael Müller, Tórshavn
Jósvein Nielsen, Vági
Marita Næs, Tórshavn
Emil Olsen, Hósvík
Jytte Olsen, Tórshavn
Beinta Patursson, Kirkjubø
Fríða Patursson, Kirkjubø
Anna Petersen, Kvívík
Kári Poulsen, Tórshavn
Magnus Poulsen, Tórshavn
Sigrun Samuelsen, Tórshavn
Esmar Simonsen, Sørvági
Inga Sørensen, Hoydalar
Ragnhild Skarðhamar, Tórshavn
Elna Ström, Trongisvági
Bjarni Thomsen, Tvøroyri
Fridjof Tórgarð, Tórshavn
Hanna Ø sterø, Skálabotni

Matematisk deild

Dánjal Jákup Andreasen, Vestmanna
Eyðun Dal-Christiansen, Tórshavn
Torleif Dalsgaard, Skálavík
Andras Danielsen, Strendur
Bjarni Djurhuus, Kollafjørður
Janus Dragasund, Tórshavn
Anna á Dunga, Tórshavn
Gordon Eidesgaard, Tórshavn
Jórun Eliasen, Leirvík
Daniel Eysturstein, Leirvík
Atli Gregersen, Gøta
Jóannes Gullaksen, Hattarvík
Niels Gullbein, Tórshavn
Jóannes Hansen, Tórshavn
Magnus Hansen, Tórshavn
Carsten Haubjerg, Tórshavn
Ragnar Heinesen, Kunoy
Hans Højgaard, Tórshavn
Jákup Jacobsen, Kunoy
Jóan Hendrik Jacobsen, Norðagøta
Kristian Holm Jacobsen, Tórshavn
Lena Jacobsen, Sandvík
Elsa Maria Joensen, Lamba
Osvald Joensen, Sandavági
Katrina Johannesen, Tórshavn
Andras Kristiansen, Gjógv
Terje á Lakjuni, Fuglafjørður
Georg Magnussen, Miðvági
Magni Magnussen, Tórshavn
Mikkjal Mikkelsen, Klaksvík
Sjúrður Olsen, Tórshavn
Petur Birgir Petersen, Tórshavn
Jóna Poulsen, Vestmanna
Nelly Reinert, Tórshavn
Sigmund Reinert, Tórshavn
Bjarni Restorff, Tórshavn
Óli Simonsen, Vági
Bjarki Skaale, Tórshavn
Óli Strøm, Trongisvági
Sonja Sørensen, Klaksvík
Petur Chr. Thomsen, Skála
Absalon Ø sterø, Trøllanes

STUDENTARNIR 1976



REAL—PRÓGV 1976

3.r

1. Marita Arge, Tórshavn
2. Dánjal Klein Christiansen, Gjógv
3. Kristian Dam, Kollafjørður
4. Annfinn Danielsen, Tórshavn
5. Jón Ellingsgaard, Tórshavn
6. Eyð í Funningsstovu, Tórshavn
7. Maria Gustavon, Tórshavn
8. Edvard Hansen, Nólsoy
9. Hildibjørg Hjaltalin, Tórshavn
10. Ása Joensen, Kollafjørður
11. Anker Petersen, Tórshavn
12. Fríðbjørg Petersen, Kollafjørður
13. Gunnvá Sandoy, Tórshavn
14. Súsanna Sivertsen, Frederikshåb
15. Ásvald Simonsen, Hoyvík
16. Svanhild Simonsen, Tórshavn
17. Hans Pauli Sundstein, Tórshavn
18. Birgit Dam, Tórshavn

HF — HOYDALAR 1976



Hf-arnir 1976

Símun Abrahamsen, Strendur
Hanus Christiansen, Stykki
Egi Dam, Tórshavn
Åsa Egholm, Tórshavn
Tummas Eliasen, Leirvík
Eyðfinnur Finnson, Lambi
Helga Follend, Vestmanna
Andrea Hansen, Argir
Hanus Petur Hansen, Saksun
Sára Heinesen, Klaksvík
Dagmar Húsdal, Sørvágur
Gunhild Isfeldt, Tórshavn
Eliesar Jacobsen, Tórshavn
Jóna Jacobsen, Sørvágur
Frígerð Jakobsen, Saltangará
Jón Eirikur Joensen, Miðvágur
Kristian Joensen, Kollafjørður
Páll Petur Joenen, Sørvágur
Hallur Johannesen, Tórshavn
Maria Johannesen, Glyvrar
Brúsi Johannesen, Tórshavn
Súsan Johansen, Strendur
Marit Kjærbo, Fuglafjørður
John Kruse, Tvøroyri
Michael Mikkelsen, Sørvágur
Sofía Nattestad, Miðvágur
Eva Susanne Nielsen, Tórshavn
Joen Hendrik Olsen, Vestmanna
Óli Hans Olsen, Syðrugøta
Jónsvein Poulsen, Sandur
Sofus Rubeksen, Tórshavn
Bergljót Strøm, Tórshavn
Thorbjørn Viderø, Hvalba
Eydna Weihe, Sørvágur
Rannveig Weihe, Tórshavn
Harriet Øregaard, Saltnes

HF — Klakksvík 1976

1. Símun Absalonsen, Klaksvík
2. Olga Biskupstø, Klaksvík
3. Hans David Dam, Norðdepli
4. Dánjal Ennistig, Klaksvík
5. Louise Fuglø, Klaksvík
6. Ólavur Høgnesen, Klaksvík
7. Ása Isaksen, Klaksvík
8. Jógvan Brim Joensen, Klaksvík
9. Lena Joensen, Klaksvík
10. Justinus Johannesen, Leirvík
11. Annfríð Mikkelsen, Leirvík
12. Jákup Mikkelsen, Klaksvík
13. Ása Mortensen, Klaksvík
14. Jórun Niclasen, Klaksvík
15. Anna Poulsen, Klaksvík
16. John Sigurðsson, Klaksvík
17. Terje Sigurðsson, Klaksvík
18. Jóngerð Simonsen, Klaksvík
19. Albert Sjúrðarberg, Klaksvík
20. Karl Thomsen, Klaksvík

Lærararnir: Hans David Matras
Hellen Heinesen
Johnny Thomsen

HF-næmingar Suðuroy 1976

Jaspur Bjarkhamar, Vágur
Katrin Groth-Larsen, Tvøroyri
Majken Hammer, Tvøroyri
Herfríð Hermansen, Tvøroyri
Sigrun Hovgaard, Hovi
Jónsvein Hovgaard, Hovi
Finn Jacobsen, Vágur
Mouritz Joensen, Vágur
Thomas Joensen, Sumba
Andrew Kjærbo, Sumba
Randi Lindenskov, Vágur
Johan Marner Lisberg, Tvøroyri
Sjúrður Ludvig, Vágur
Páll Michelsen, Tvøroyri
Símun Midjord, Vágur
Jens Pauli Nolsøe, Trongisvágur
Jack Juul Petersen, Tvøroyri
Connie Poulsen, Vágur
Tóra Poulsen, Vágur
Anna Sigmundsdóttir Poulsen, Sandvík

Næmingarnir 1. mai 1977

3.a

1. Birna Breckmann, Tórshavn, N
2. Ívar Bærentsen, Tórshavn, S
3. Hildigunn Christiansen, Tórshavn
4. Óluva Christiansen, Skála, N
5. Marjun Dahl, Vestmanna, S
6. Esther Dam, Tórshavn, N
7. Pia Dam, Tórshavn, N
8. Jonna Djurhuus, Tórshavn, N
9. Heidi Eirikstoft, Tórshavn, N
10. Eyðdis Ejedesgaard, Tvøroyri, N
11. Marna Gásadal, Sørvágur, N
12. Hentzar Hammer, Tvøroyri, N
13. Bergur Hansen, Tórshavn, N
14. Birgit Hansen, Funningsbotnur, N
15. Tummas Hansen, Toftir, N
16. Tormund Haraldsen, Sørvágur, S
17. Elin Heinesen, Tórshavn, S
18. Høgni Høgnesen, Leirvík, N
19. Hanna Jacobsen, Tórshavn, N
20. Jógvan Jacobsen, Fuglafjørður, N
21. Malan Jacobsen, Vágur, S
22. Súsanna Jensen, Tórshavn, N
23. Ragnar Rubeksen, Tórshavn, S

3.b

1. Hervør Henriksen, Tórshavn, S
2. Ingun Mohr Jacobsen, Klaksvík, S
3. Heri Jógvan Joensen, Svínoy, N
4. Marin Joensen, Kollafjørður, N
5. Sigtór Joensen, Gjógv, N
6. Elna Johannesen, Rituvík, N
7. Jógvan Johansen, Strendur, N
8. Torgerð Klein, Tórshavn, N
9. Sólrit Mikkelsen, Skála, N
10. Dagmar Joensen-Næs, Tórshavn, N
11. Uni Næs, Tórshavn, N
12. Astrid Olsen, Klaksvík, N
13. Wanja Petersen, Tórshavn, N
14. Eydna Poulsen, Tórshavn, N
15. Ólavur Rasmussen, Eiði, N
16. Finn Terje Samuelsen, Tvøroyri, S
17. Marjun Simonsen, Hoyvík, N
18. Pól Sørensen, Klaksvík, S
19. Sunniva Sørensen, Klaksvík, S
20. Tordis Thomsen, Tórshavn, N
21. Simona Weihe, Selatrað, N

3x

1. Hans Jákup Andreasen, Skála, F
2. Búgvi Apol, Tórshavn, S
3. Jørgen Bech, Vestmanna, F
4. Sámal Christiansen, Tórshavn, N
5. Djóni Dalsgarð, Velbastað, N
6. Jógvan Dalsgarð, Skálavík, N
7. Uni Danielsen, Hoydalar, S
8. Aimy Djurhuus, Tórshavn, N
9. Kristian Eliasen, Klaksvík, F
10. Johannes Ellefsen, Miðvágur, S
11. Jákup Enni, Tvøroyri, F
12. Eilif Gaard, Trongisvágur, N
13. Jeanne Reinert Hansen, Tórshavn, S
14. Torfinn Højgaard, Tórshavn, N
15. John Jacobsen, Vestmanna, F
16. Oddbjørg Jacobsen, Tórshavn, N
17. Kári Jespersen, Tvøroyri, N
18. Benadikt Joensen, Akrar, F
19. Fischer Johannesen, Klaksvík, S
20. Jákup Joensen, Tórshavn, F
21. Kristian Johansen, Argir, S
22. Ingi Stefansson, Tórshavn, N
23. Dávur Winther, Fuglafjørður, N

3y

1. Marni Danielsen, Tórshavn, S
2. Hanna Poulina Joensen, Tórshavn, F
3. Óli Jákup Joensen, Leivík, F
4. Annfinnur Johannesen, Glyvrar, F
5. Mia av Kák, Sørvágur, N
6. Bartal Súni Kass, Tórshavn, F
7. Poul Marius Kjærbæk, Sunnba, N
8. Arnbjørn Kristiansen, Skál, F
9. Ólavur Sjúrður Lydersen, Kirkjubø, N
10. Hanna Maria Magnussen, Nes, F
11. Elsebet Josefina Matras, Klaksvík, N
12. Bogi Mortensen, Tvøroyri, F
13. Katrin Mørkøre, Tórshavn, N
14. Jan Dalberg Nielsen, Tórshavn, F
15. Kári Nielsen, Tórshavn, N
16. Mannbjørn Olsen, Porkeri, F
17. Sarita Olsen, Vestmanna, N
18. Hildegunn Petersen, Vestmanna, N
19. Kári Petersen, Hvalvík, F
20. Leo Poulsen, Nólsoy, F
21. Kristian Martin Rubeksen, Tórshavn, S
22. Åsbjørn Strøm, Trongisvágur, F
23. Hans Tausen, Tórshavn, F
24. olivur Thomsen, Klaksvík, S
25. Brita Katrina á Váli, Tórshavn, F

2a

1. Magni Arge, Tórshavn, S
2. Halldóra Dam, Norðskála, N
3. Katrin Ellingsgaard, Tórshavn, N
4. Sofía Hansen, Miðvágur, N
5. Bjørg Hofgaard, Tvøroyri, N
6. Katrina av Kák, Tórshavn, N
7. Ólavur Jákup Kristoffersen, Tórshavn, N
8. Sufía Lamhauge, Tórshavn, N
9. Hansa Merkistein, Tórshavn, N
10. Maria Elisabeth Midjord, Tórshavn, S
11. Kristianna Mohr, Tórshavn, N
12. Andras Mortensen, Tórshavn, N

2b

1. Majken Johansen, Tórshavn, S
2. Armgarð Mortensen, Tórshavn, N
3. Edvard Nielsen, Saltangará, S
4. Sigmundur Olsen, Porkeri, S
5. Gerda Holm Poulsen, Tórshavn, N
6. Berit Rasmussen, Tórshavn, N
7. Bergljót Reinert, Eiði, S
8. Katrin Reinert, Eiði, N
9. Ruth Róin, Hoydalar, N
10. Arnbjørn Sivertsen, Tórshavn, S
11. Annika Skaalum, Vágur, S
12. Hákun Sólbjørg, Klaksvík, S
13. Bjørk Viderø, Tórshavn, N

2x

1. Jens Petur Bærentsen, Tórshavn, F
2. Ulla Bærentsen, Hoydalar, F
3. Mortan Carlsen, Tórshavn, N
4. Dánial Klein Christiansen, Gjógv, N
5. Sámal Debes, Tórshavn, N
6. Tróndur Djurhuus, Tórshavn, F
7. Hans Esbern Ellingsgaard, Eiði, S
8. Åsa Hansen, Tórshavn, S
9. Elsa Maria Hansen, Tórshavn, S
10. Gunnar Hansen, Nólsoy, F
11. Rúni Heinesen, Klaksvík, F
12. Signar Heinesen, Sørvágur, F
13. Karin Højgaard, Tórshavn, N
14. Kristian Johansen, Tórshavn, S
15. Jóannes Kjølbro, Klaksvík, F
16. Dan Lamhauge, Tórshavn, F
17. Birger Lauritsen, Strendur, F
18. Niels Christian Nolsøe, Klaksvík, F
19. Ingi Vestergaard, Tórshavn, F
20. Ø ssur Winthereig, Tórshavn, F
21. Jónatan Zachariasen, Tórshavn, N

2y

1. Guðrið Ellefsen, Tórshavn, S
2. Petur Hansen, Tórshavn, N
3. Heðin Jacobsen, Tórshavn, F
4. Jens Jacobsen, Skálafjørður, F
5. Jóna Jacobsen, Eiði, S
6. Carl Johan Jensen, Kollafjørður, F
7. Helgi Joensen, Syðrugøta, F
8. Jógvan Páll Joensen, Hvalvík, F
9. Anna Elisabet Kass, Tórshavn, S
10. Henry Mellimgaard, Klaksvík, N
11. Jan Mortensen, Sandi, F
12. Karin Olsen, Tvøroyri, N
13. Karmal Olsen, Vestmanna, N
14. Janus Petersen, Tórshavn, F
15. Johan Poulsen, Strendur, F
16. Marjun Restorff, Tórshavn, F
17. Frans Róin, Hoydalar, N
18. Elspa Simonsen, Argir, N
19. Eyðfinnur Stefansson, Tórshavn, N
20. Bjarni á Steig, Tórshavn, F
21. Jan Sørensen, Tórshavn, N
22. Kristin Andreas Vestergaard, Vágur, N

1a

1. Marita Arge, Tórshavn
2. Carsten Arnskov, Tórshavn
3. Hans Dalsgaard, Tórshavn
4. Hansina Dam, Tórshavn
5. Sólrun Dam, Tórshavn
6 Steinbjarta Dam, Norðskála
7. Jacob Danielsen, Tórshavn
8. Alfrida Hammer, Runavík
9. Andriása Hansen, Saltangará
10. Gunnvør Hanusson, Tórshavn

11. Húngunn Højgaard, Tórshavn
12. Lív Holm Jacobsen, Tórshavn
13. Ingrid Jensen, Tórshavn
14. Marlena Dahl Joensen, Vágur
15. Elsebeth Johannesen, Fuglafjørður
16. Marna Johansen, Tórshavn
17. Karin Kass, Tórshavn
18. Anker Petersen, Tórshavn

1b

1. Ann Ellefsen, Tórshavn
2. Rannvá Hansen, Tórshavn
3. Fríða Johannsen, Oyri
4. Ingun Larsen, Tórshavn
5. Sólja Michelsen, Tórshavn
6. Marjun Mikkelsen, Syðrugøta
7. Sonja Mikkelsen, Syðrugøta
8. Silri Mortensen, Tórshavn
9. Bjørg Olsen, Glyvrar
10. Ingun Olsen, Tórshavn
11. Gudrun Dal Poulsen, Tórshavn
12. Rita Poulsen, Tórshavn
13. Mami Schrøter, Nes
14. Estrid Sigvardsen, Tórshavn
15. Ruth Sundstein, Tórshavn
16. Michala Vang, Hvalba
17. Asta Volles, Eiði
18. Jóhanna Volles, Eiði
19. Marianne Øre, Syðrugøta

1m

1. Leif Abrahamsen, Fuglafjørður
2. Svend Emil Andreasen Tórshavn
3. Torbjørn Andreasen, Tórshavn
4. Sigtór Andreassen, Hvalvík
5. Annfinn Danielsen, Tórshavn
6. Albert Ellefsen, Miðvágur
7. Hans Mourtis Foldbo, Leirvík
8. Jógvan Gregersen, Gøta
9. David Reinert Hansen, Tórshavn
10. Edvard Hansen, Nólsoy
11. Mikael Johan Heinesen, Toftir
12. Hanus Højgaard, Rituvík
13. Reinhold Isaksen, Norðagøta
14. Pól Øregaard Jacobsen, Norðagøta
15. Jóannes Jensen, Tórshavn
16. Páll Súni Joensen, Klaksvík
17. Sverri Kallsberg, Tórshavn
18. Eyðbjørn Jón Kjærbo, Vágur
19. Jórun Mortensen, Tórshavn
20. Sámal Nielsen, Tórshavn
21. Erla Olsen, Tórshavn

HF næmingar 1. mai 1977

2p

1. Kristian Holm Bech, Tórshavn
2. Anna Berthelsen, Strendur
3. Sigmar Bláberg, Funningur
4. Jan Christiansen, Tórshavn
5. Heri Dam, Tórshavn
6. Jón Davidsen, Válur
7. Fríðhildur Davidsen, Vestmanna
8. Kári Djurhuus, Vestmanna
9. Snorri Halldórson, Tórshavn
10. Hjørleif Hjaltalin, Tórshavn
11. Elsebeth Højgaard, Rituvík
12. Gunvør Højgaard, Vestmanna
13. Hervør Højsted, Funningur
14. Ása í Jákupsstovu, Tórshavn
15. Fía Joesen, Vestmanna
16. Hansina Johannesen, Kollafjørður
17. Róin Klementsen, Sandur
18. Samuel Peter Petersen, Fuglafjørður

2q

1. Betty Fjallstein, Tórshavn
2. Jan Arge Jacobsen, Tórshavn
3. Anna Lis Jensen, Tórshavn
4. Niels Andreas Joensen, Kvívík
5. Randi Johannesen, Mykines
6. Torfinn Johansen, Miðvágur
7. Johan Peter Niclassen, Tórshavn
8. Jon Niclasen, Tórshavn
9. Jacob Nielsen, Tórshavn
10. Andras Nybo, Hósvík
11. Marjun Olsen, Tórshavn
12. Anna Maria Oskarsson, Tórshavn
13. Christian Poulsen, Tórshavn
14. Anton Rasmussen, Strendur
15. Jóna Rasmussen, Strendur
16. Elly Poulina Schneider, Tórshavn
17. Inga Thomsen, Syðrugøta
18. Malan Thomsen, Tórshavn
19. Poul Jákup Thomsen, Tórshavn

1p

1. Jákup Christiansen, Sørvágur
2. Meinhild Reinert Djurhuus, Strendur
3. Ann Kirstin Djurhuus, Vestmanna
4. Annika Festirstein, Eiði
5. Heidi Gásadal, Sørvágur
6. Jóannes í Gerðinum
7. Jóhannus Gunnar Egholm, Sørvágur
8. Eva højgaard, Rituvík
9. Fridrikka Maria Jensen, Sandur
10. Jákup Egil Jensen, Tórshavn
11. Fríðhild Joensen, Kollafjørður
12. Fríða Johannesen, Skopun
13. Kára Johannesen, Leirvík
14. Sólvá Larsen, Eiði
15. Guðrun Lava, Tórshavn
16. Kjartan Madsen, Kvívík
17. Aleks Niclasen, Tórshavn
18. Mona Rasmussen, Argir
19. Heini Restorff, Tórshavn
20. Tórhallur Simonsen, Sandavágur
21. Jónfinn Thomsen, Syðrugøta
22. Margreta Viderø, Hvalba

1q

1. Hjørleif Dahl, Oyri
2. Marius Davidsen, Sørvágur
3. Pouline Elisabeth Ellendersen, Tórshavn
4. Annika í Garði, Strendur
5. Bergur í Garði, Strendur
6. Unn Hansen, Tórshavn
7. Martin Jacobsen, Tórshavn
8. Lilian Graciela Joensen, Tórshavn
9. Óluva Nolsøe Joensen, Eiði
10. Jonhild Johansen, Leynum
11. Rógvi Johansen, Tórshavn
12. Fridrikka Lenvig, Kvívík
13. Óli Midjord, Tórshavn
14. Birgit Isholm Mohr, Tórshavn
15. Margret Elisabeth Mortensen, Sandur
16. Maritha Nolsøe, Tórshavn
17. Sigrid Nónsgjógv, Gjógv
18. Anfinnur Olsen, Toftir
19. Súsanna Poulsen, Skopun
20. Tóroddur Poulsen, Tórshavn
22. Jensina Tausen, Tórshavn
23. Rani Wardum, Tórshavn

1r

1. Eyðfinnur Egholm, Tórshavn
2. Georg Hansen, Miðvágur
3. Heini Hansen, Tórshavn
4. Jákup Egholm Hansen, Sørvágur
5. Eyðgunn Henriksen, Sørvágur
6. Hildur Jacobsen, Tórshavn
7. Lissi Jacobsen, Fuglafjørður
8. Óli Jacobsen, Argir
9. Emmy Joensen, Miðvágur
10. Turið Joensen, Tórshavn
11. Anna Johannesen, Hoydalar
12. Paula Justinussen, Tórshavn
13. Tordis Klein, Skála
14. Kirstin Lisberg, Vestmanna
15. Eydna Miðjord, Tórshavn
16. Poul Müller, Tórshavn
17. Dánial Petur Olsen, Hósvík
18. Kartni Ravnsfjall, Miðvágur
19. Anna Samuelsen, Kollafjørður
20. Kristina Simonsen, Sandavágur
21. Unn Simonsen, Sandur

Myndin, sum vann fotokappingina hjá Skansastovu.

Næmingar við Klaksvíkar HF-skeið 1. mai 1977

2.flokkur

1. Maria Hammer Andreasen, Klaksvík
2. Adrian Dalsá, Klaksvík
3. Kjell Eliassen, Klaksvík
4. Per Jacobsen, Klaksvík
5. Tove Jacobsen, Klaksvík
6. Bergur Joensen, Klaksvík
7. Eyolvur Joensen, Klaksvík
8. Bjørg Nolsøe Lassen, Klaksvík
9. Andrias Mikkelsen, Klaksvík
10. Beth Ellebye Olsen, Klaksvík
11. Leif Olsen, Klaksvík
12. Alfred Petersen, Klaksvík
13. Sunniva Mathilda Petersen, Fuglafjørður
14. Páll Rasmussen, Klaksvík

1. flokkur

1. Óli Christiansen, Klaksvík
2. Vitalia Clementsen, Klaksvík
3. Friðbjørg Steinberg úr Fugloy
4. Constanca Óla Gloria Guðjónsson, Klaksvík
5. Marna Hansen, Klaksvík
6. Johan Henriksen, Klaksvík
7. Jórun Høgnesen, Klaksvík
8. Jan Pauli Isaksen, Klaksvík
9. Maria Brinck Jensen, Klaksvík
10. Hanus Joensen, Klaksvík
11. Jógvan Joensen, Klaksvík
12. Juliane Maiken Joensen, Klaksvík
13. Ragna Laksafoss, Klaksvík
14. Hans Kári Lindberg, Klaksvík
15. Trina Lützen, Klaksvík
16. Margaretha Petersen, Klaksvík
17. Rúni Poulsen, Klaksvík
18. Heidi Rubeksen, Fuglafjørður
19. Karl Johan Thomsen, Klaksvík

Næmingar við Suðuroyar HF-skeið 1. mai 1977

2. flokkur - Vágur kkur

1. Johanna Bech, Vágur
2. Búi Brattaberg, Vágur
3. Winnie Bertholdsen, Vágur
4. Dánjal Petur Djurhuus, Porkeri
5. Pauli Hansen, Vágur
6. Martin Hentze, Vágur
7. Elin Larsen, Vágur
8. Sørin Lisberg, Vágur
9. Leivur Mohr, Vágur
10. Sólvá Mortensen, Porkeri
11. Bodil Poulsen, Porkeri
12. Kirstin Strøm, Vágur
13. Tonnie Strøm, Vágur
14. Schandorff Vang, Vágur
15. Magni Kjærbo eystan Á, Sumba

2. flokkur - Tvøroyri

1. Jens Pauli Bærentsen, Tvøroyri
2. Unn Dimon, Tvøroyri
3. Jan Forná, Tvøroyri
4. Eirikur Hofgård, Tvøroyri
5. Hans Pauli Holm, Tvøroyri
6. Áki Mortensen, Tvøroyri
7. Signar Mortensen, Tvøroyri
8. Ann-Marie Nielsen, Famjin
9. Anna Maria Poulsen, Sumba
10. Ewald Rasmussen, Øravík
11. Randi Strøm, Tvøroyri
12. Finn Thomsen, Tvøroyri

1. P. — Tvøroyri

1. Eyðólv Dimon, Tvøroyri
2. Irdi Djurhuus, Tvøroyri
3. Randi Djurhuus, Tvøroyri
4. Jóruna Eið, Tvøroyri
5. Jón Ingi Ejdesgaard, Tvøroyri
6. Marni Holm, Tvøroyri
7. Magnus Jespersen, Tvøroyri
8. Eyðvør Mortensen, Tvøroyri
9. Gudmund Mortensen, Tvøroyri
10. Manbjørn Mortensen, Tvøroyri
11. Hildigunn Nielsen, Tvøroyri
12. Rannvá Strøm, Tvøroyri
13. Jacoba Sørensen, Tvøroyri

1. Q. — Vág

1. Daniel Johannes Djurhuus, Vágur
2. Jákup Jacobsen, Vágur
3. Maria Joensen, Vágur
4. Eyðun Leo, Vágur
5. Jonhild Tausen, Vágur
6. Elsebeth Vágsheim, Vágur
7. Kristian Vestergaard, Vágur

Studentaskúlastrukturin



FLOKKSHEIT

1. flokkur á nýmálsligu deild verður kallaður	1n
Javnflokkar verða kallaðir	1a og 1b
1. flokkur á matematisku deild verður kallaður	1m
Javnflokkar verða kallaðir	1x og 1y
2.flokkur á nýmálsligu deild verður kallaður	2n
Javnflokkar verða kallaðir	2a og 2b
Nýmálsliga greinin verður kallað N	
Samfelagsgreinin verður kallað S	
Eitt samfelagsmálsligt lið við næmingum úr 2a og 2b verður kallað	2abS
Eitt nýmálsligt lið, sum bert hevur næmingar úr 2a, verður kallað	2aN

2. flokkur á matematisku deildini verður kallaður 2m
Javnflokkar verða kallaðir 2x og 2y
Mat.-fysisk grein verður kallað F
Natúrfrøðislig grein verður kallaðN
Samfelagsgreinin verður kallað S
Eitt mat.-fysiskt lið, sum bert hevur næmingar úr 2y verður kallað 2yF
Eitt natúrfrøðisligt lið við næmingum úr 2x og 2y verður kallað 2xyN
Eitt mat.samfelagslið við næmingum úr 2x og 2y verður kallað 2xyS

3. flokkar verða kallaðir eins og 2. flokkar.

TÍMASKIPAN FYRI STUDENTASKÚLAN		málslig deild							matematisk deild							
		felagsfak			serfak				felagsfak			serfak				
					ným		samf					fys		samf		nat	
		1	2	3	2	3	2	3	1	2	3	2	3	2	3	2	3
føroyskt	FØ	4	3	3					4	3	3						
danskt	DA	3	3	3					3	3	3						
franskt (russiskt)	FR RU	5	3	3					5	3	3						
söga + samfelagslæra	SØ SL	2	3	3	0	1			2	3	3	0	1			0	1
fornaldarfrøði	FF	1	2	0					1	2	0						
religión	RE	0	1	2					0	1	2						
sangur (tónleikur)	SA	1	1	1					1	1	1						
fimleikur	FI	2	2	2					2	2	2						
felagstímar (felagsfak)		18	18	17					18	18	17						
týskt	TÝ	3			3	5	(3 | 5)									
latín	LA	4			4	0											
eingilskt	EI	4			4	6	3	5	5	0	0						
matematikk	MA	2	3	0					5			5	6	3	3	3	3
geografi	GE	2					3	2				3	0	3	2	3	2
biologi	BI	0	0	3								0	3	0	3	} 3	7
biokemi	BI																
kemi	KE								2			3	0	1	0	3	0
fysikk	FY								3			3	5	2	2	2	2
samfelagsfak	SF						5	5						5	5		
sertímar		15	3	3	11-12		11-12		15	0	0	14-15		14-15		14-15	
felags- + sertímar		33-32-32							33-32-32								

Møtiskylda

fyri studentaskúlan

Næmingarnir hava møtiskyldu í øllum lærigreinum.

Fyri at fyribyrgja misrøking av møtiskylduni eru fylgjandi reglur:

1. Fráverurnar verða uppgjørdar í a) einstøkum tímum b) einstøkum døgum. Næmingurin skal siga umsitingarleiðaranum frá (ella á skrivstovuni), tá hann hevur verið burtur.

2. Fráverurnar verða gjørdar upp hvørja viku, og fáa næmingarnir uppgerð yvir fráverurnar frá flokkslæraranum vikuna eftir.

3. 5 einstakir tímar = 1 dag.

4. Tá næmingurin hevur verið u. 20% burtur frá undirvísingini, fær hann ein munnliga ávaring.

5. Verður eingin bati, fær næmingurin skrivliga ávaring, ið verður send foreldrunum í innskrivaðum brævi, um næmingurin er undir 18 ár, honum sjálvum, um hann er yvir 18 ár, og tá avrit av brævinum til foreldrini. Í hesi ávaring kemur at standa, at um fráverurnar ikki halda uppat nú, verður boða frá til direktoratið fyri studentaskúlan og hf, ið síðan kemur at gera av, um næmingurin sleppur til prógvtøku.

6. Læararnir hava skyldu at føra protokollina hvønn tíma, og eingin næmingur má svíða fyri, at hetta ikki verður gjørt.

Gjørt verður vart við, at næmingurin umframt møtiskyldu hevur skyldu at lata inn skrivlig arbeiði regluliga. Lærararnir í viðkomandi lærigreinum hava skyldu at ansa eftir, at skrivlig arbeiði verða latin inn regluliga.

Dømi

Tvey dømi um fráverurnar 8 fyrstu vikurnar í skúlaárinum. 8 vikur = 40 dagar. 20% av 40 døgum = 8 dagar.

A. Ein næmingur hevur verið sjúkur í 8 samanhangandi dagar. Hesin næmingur fær onga ávaring, tí lærararnir vita, hvussu nógv hesin næmingurin hevur mist, og næmingurin hevur lætt við at vinna tað mista aftur.

B. Ein næmingur hevur verið burtur í 3 ikki samanhangandi dagar og 25 einstakar tímar. Tilsamans 8 dagar (sí pkt. 3). Hesin næmingur fær ávaring, tí lærararnir ómøguliga kunnu vita, hvat næmingurin hevur mist, og næmingurin hevur tí eisini ilt við at vinna aftur tað, ið mist er.

AM

fyri hf

Møtiskyldan innan fyri HF er nakað tað sama sum fyri Studentaskúlan, men hon verður bert strangari hildin, tí at næmingar á HF altíð hava tann møguleika, at taka prógvtøkuna sum sjálvlesandi. Tað vil siga, at um ein næmingur forsømir undirvísingina so fer hann til prógvtøku sum sjálvlesandi og skal so upp í øllum pensum, meðan tey, ið fylgja skeiðinum, ið summum fakum hava minni pensum og hava høvi til at fáa studning.

Reglurnar eru soleiðis, at minst 80% av undirvísingini skal fylgjast. Hetta er galdandi fyri alt skeiði, og eisini fyri tey einstøku fakini, soleiðis at ein næmingur ikki kann forsøma eitt einstakt fak uttan at verða koyrdur. Um 15% av skrivligum uppgávum ikki verða latnar inn, so hevur hin ávísi lærari skyldu at geva boð til rektarin um hetta. Um ein næmingur hevur eina umbering fyri ikki at møta upp, t.d. sjúku og tílíkt, so kunnu undantaksloyvi gevast, so at næmingurin sleppur at fylgja skeiðinum, men hann skal upp í fullum pensumi kortini. Um næmingurin forsømir ov nógv fær hann fyrst eina munnliga ávaring frá rektarinum, so eina skrivliga, um forsømingin ikki heldur uppat og so verður skrivað til Ráðið. Bæði rektarin og næmingurin senda eina frágreiðing um sakina og út frá hesum tekur Ráðið støðu til um næmingurin skal burturvísast.

Uppgerð fyri uppmøting verður gjørd frá fyrsta degi og gongur til skeiði er at enda tvey ár seinni.

Dømi: Ein næmingur forsømir ov nógvar tímar í fyrstuni. Hann fær boð (fyrstu ávaring um hetta í oktober, men heldur áfram við at forsøma, og hann verður burturhýstur frá skeiðinum, men kann altíð taka prógvtøkuna sum sjálvlesandi.

Dømi: Eitt konufólk verður upp á vegin, og má av hesum forsøma undirvísingina so nógv, at hon kemur upp um tey 20%. Hon sleppur at fylgja undirvísingini, men skal upp til prógvtøkuna í øllum pensum, men missir ikki studningin.

GH

Kanning gjørd í Hoydølum av, hvussu nógv næmingarnir nýta í peningi til bøkur.

Í fíggjarárinum 1976-77 eru játtaðar 5,3 mill. kr. til Føroya Studentaskúla og HF-skeið. Til HF á bygd eru játtaðar 0,8 mill. kr. og har aftrat 1,0 mill. kr. frá danska statinum. Hetta gevur, at næmingarnir í Hoydølum kosta 14.000 kr. hvør og næmingarnir á bygd 22.000 kr.

Hesar útreiðslur eru ikki tær sum hava størstan áhuga fyri næmingar, teirra trupulleikar eru at fáa nóg mikið av peningi til at klára dagligu útreiðslur sínar. Í apríl mánaða 1976 varð gjørd ein kanning; av tí at hvørki tíð ella umstøður vóru til at gera nakað djúptgangandi, fór hon fram á fylgjandi hátt:

Hvør flokkur fekk so nógv spurnarbløð, sum talið av greinum var T.d. fekk 2 × 3 spurnarbløð, til 2xF, 2xS og 2xN. Á spurnarblaðnum var spurt um 1) hvussu nógv hvør næmingur hevði keypt í bókum, um allar bøkur vóru keyptar nýggjar (óbrúktar) 2) teir næmingar, sum búðu á leigaðum kamari t.v.s. ikki búðu heima, á Kostdeildini ella ókeypis hjá familju, skuldu hvør sær siga frá húsaleigu pr. mánaða og samlaðu útreiðslum ÷ kamar og bøkur

Orsøkin til, at vit bert spurdu hesar næmingar seinasta spurning, var, sum fyrr umtalað tíðin og umstøðurnar at gjøgnumarbeiða eitt stórt taltilfar, og at á henda hátt fingu vit fatur í teimum »dýrastu« næmingunum.

24 spurnarbløð vóru býtt út til allar flokkar uttan 2 HF; hetta var praktisk ov trupult vegna teirra skipan um vællærugreinar; 14 spurnarbløð komu aftur svarandi til 159 næmingar, tó so at øll floksstig (klassetrin) vóru umboðaði, 10 spurnarbløð svarandi til 129 komu ikki aftur.

Talva 1.

Bøkur ÷ útreiðslur hjá einum næmingi frá 18/8-76 til miðan arpíl 1976

1g	1070 1370 1492
2g	660 830 850 1000
3g	700 920 950 1000 1045
1pHF	1320 1360 1410

Av hesum sæst at tølini eru ógvuliga ójøvn, men ein kann síggja at størstu útreiðslurnar eru í 1g og 1HF flokkunum minst í 2g og vaksandi aftur í 3g. Rokna vit skúlaárið til 10 mánaðar sæst at eingin 1.flokkur hevur havt minni enn 100,- kr. um mánaðin,

onkur 150 kr. um mánaðin í bókaútreiðslum.

Eingin næmingur fer undir 66.- kr. um mánaðin í bókaútreiðslum. Aftur at hesum útreiðslum skal leggjast alt hvat viðvíkur pappír og samlimappum av ymsum slag.

Húsaleiga um mánaðin. 39 næmingar.

húsaleiga um mánaðin 1)	tal av næmingum	næm. í %
150-250 kr.	13	33
300-400 kr.	24	62
450-500 kr.	2	5
	39	100

1((onki tal lá uttanfyri hesar flokkar)

talva 2

Samlaðar útreiðslur ÷ húsaleiga og bøkur um mánaðin. 40 næmingar.

saml. útreiðslur 2)	tal av næm.	næm. í %
undir 500	11	27,5
500-799	13	32,5
800-1000	10	25,0
yvir 1000	6	15,0
	40	100,0

2) lægsta tal 200,-; hægsta tal 2200.- kr.

Tilfarið vísir at 39 av 157, t.v.s. 25% av teimum, sum hava svarað, búgva til leigu, 60% av øllum næmingum skúlans eru av bygd, munurin millum hesi tøl kemur óivað av teimum sum búgva á kostdeildini og sum ikki vóru biðin um at svara.

95% gjalda upp til 400,- kr. Hetta er nógvur peningur tá ið hugast skal um at hægsti studningur er góðar 7.000,- kr. um árið, t.v.s. 700,- kr. um mánaðin. Næmingar av bygd kunnu fáa døgurða á Kostdeildini, 5 dagar um vikuna kosta 160,- kr. Av hesum sæst at nógv verður ikki eftir av studninginum til mat, klæðir, bøkur, ferðapening o.t.

Talva 2 vísir eina ógvuliga ójavna

mynd, ein uppbýting eftir aldri gevur somu mynd, tað er ikki so at yngru flokkarnir brúka minni enn teir eldru. Tað er torført at greiða frá, hví so er; ein forkláring kundi verið, at teir næmingar, sum fáa pening heimanífrá, royna at klára seg við so lítið, sum gjørligt, meðan teir, sum noyddir eru at arbeiða, hava torført við at fáa arbeiði, sum eru nakað ávíst í tímatali og tí hava meira av peningi um hendur. Talvan vísir annars, at ógvuliga fá, sum búgva til leigu, kunnu klára seg sjalvt við hægsta studningi.

At enda kann viðmerkjast, at umumleið 175 næmingar við FS og HF koma av bygd; av hesum kunnu bert 62 — 45 dreingir og 17 gentur — búgva á Kostdeildini. Kostnaðurin skúlaárið 1975-76 var 390,- kr. um mánaðin fyri kost og logi, í alt 3900,- kr. um árið. Tikið inn verður á tann hátt, at næmingar, hvørs foreldur hava lága inntøku, koma fyrst inn, tað er tó vert at leggja til merkis, at bert 17 seingjarpláss eru á gentudeildini. Kynsdiskriminatión?

Vónandi kann henda stutta grein vísa á, at tað at ganga í Hoydølum er ikki nakað við ókeypis at spæla sær í 2-3 ár, bæði næmingar og foreldur mugu ofra nógvan pening uppá at fáa eitt prógv, so samfelagið kann nýta gott av teirra góðu gávum.

Foreldur og børn av bygd eru ringast fyri, serstakliga tey, sum hava heim teirra, har tað ikki er gjørligt hjá børnunum at sleppa heim beinleiðis eftir sjónum. Skulu tey eina langa landrutu, er so dýrt, at tað kunnu ganga mánaðir, uttan at foreldrini síggja børn síni.

Í øllum londum uttan um okkum fáa næmingar ókeypis bøkur frá skúlunum; hesar verða latnar aftur, tá ið skúlatíðin er liðug. Fyri 3 árum síðani fingu donsku statsgymnasiini 250,- kr. um árið fyri hvønn næming at keypa nýggjar bøkur fyri — hetta talið er óivað væl hægri nú. Tá ið ein hugsar um, hvussu nógv landið letur fyri hvønn næming longu nú, er spurningurin, hvussu nógv tað hevði havt at siga at gjalda umleið 400,- kr. um árið afturat. Ikki bert eru bókaútreiðslurnar tyngjandi fyri ta einkultu familjuna, sum skal gjalda hana, men ein onnur síða, sum kanska er meira álvarsom, er sæð frá einum pædagogiskum sjónarmiði. Lærararnir í teimum einkultu lærugreinunum hveppa seg við at biða næmingarnar keypa tær dýru, oftast bestu lærubøkurnar, og í staðin fyri at spreiða undirvísingina yvir flest møgulig evni og harvið fleiri bøkur, verða bøkurnar nýttar á tamb; hetta ger, at undirvísingin ikki altíð verður forsvarlig.

Katrin Thomassen

Tú kanst velja russiskt

Á Føroya Studentaskúla og HF-skeiði ber til at velja russiskt í staðin fyri franskt.

Við at velja russiskt fært tú høvi til at koma í samband við eitt nýtt og ókent málsligt og mentunarligt øki: tað slaviska. Av søguligum og politiskum orsøkum hava vit lítið og einki vitað um Eystureuropa, men hesi seinastu árini er broyting komin í. Heimsins størsta land, Sovjetsamveldið, hevur stóran og skjótt veksandi týdning á at kalla øllum økjum.

Høvuðsmálið í Sovjetsamveldinum er russiskt. Sovjetsamveldið hevur 250 milliónir íbúgvar, og av teimum eru 115 milliónir russarar. Umframt russararnar búgva yvir hundrað aðrar tjóðir í Sovjetsamveldinum, og tær hava eisini síni egnu mál, men øll læra russiskt í skúlanum, og russiskt verður so statt eitt felags mál fyri alt Sovjetsamveldið.

Orsøkirnar til at onkur fær hug til at seta seg inn í russiskt kunnu vera so mangar, men tað ber til at nevna trý øki, sum í framtíðini fara at seta størri og størri krøv til russisktkunnleika: mentan, handil og teknikkur.

Málið russiskt kann tykjast mongum at vera frammant og torført, men tó er tað slaviska málið russiskt ikki longri frá tí germanska føroyska enn tað romanska franska er tað. Grammatikkin er stórt sæð tann sama sum í føroyskum ella týskum: umframt tey fýra føllini, sum vit kenna, hevur russiskt tvey afturat: instrumentalis og prepositionalis. Sagnorðini eru nakað torførari enn hjá okkum, tey eru greipað, t.e. fyri hvørt føroyskt sagnorð eru tvey á russiskum.

Tað, sum mest ræðir fólk frá at fara undir russiskt, er kanska tað, sum minst hevur upp á seg: bókstavirnir. Men teir eru skjótir at læra. Vita bara:

АППАРАТ	МАШИНА (Ш = SJ)
РАДИО	ЛИТЕРАТУРА
ТЕЛЕФОН	КОСЫГИН (Ы líkist donskum y)
ЛЕНИН	ВОДКА

André Niclasen

Ferð til Sovjet-samveldið

Í juli 1976 vóru 5 næmingar frá Føroya Studentaskúla saman við læraranum, Johnny Thomsen, sum tá undirvísti í russiskum, og ferðaðust í Sovjet-samveldinum. Ferðin gekk til Leningrad, Kiev og Moskva, og hon vardi í 14 dagar.

Næmingarnir vóru: Dagmar Joensen-Næs, Katrin Mørkøre, Olivur Thomsen, Jan Nielsen og Djóni Dalsgaard.

Mynd nr. 1:
Dagmar, Djóni, Jan og Katrin damla á Dnjepránni.

Mynd nr. 2:
Dagmar og Olivur í Leningrad

Mynd nr. 3:
Djóni á Reyð-Torginum í Moskva

Spælimenninir í Hoydølum konsertferð í Orknoyggjunum og Hetlandi

— aftaná ferðina gevast teir við at spæla

Sunnukvøldið fóru Spælimenninir í Hoydølum til Skotlands við Smyrli. Teir skulu tær næstu tríggjar vikurnar ferðast í Orknoyggjunum og Hetlandi og hava konsertir og spæla til dans. Við í ferðalagnum eru 15 onnur fólk, sum í samband við konsertirnar skulu vísa føroyskan dans.

Áðrenn hópurin fer til Orknoyggjarnar skulu tey hava konsert í Thurso, einum býi stutt frá Scrabster. Frá Orknoyggjunum skulu tey flúgva norður til Hetlands. Haðani fara tey aftur til Orknoyggjarnar og ferðin endar so í Thuso, har Spælimenninir skulu luttaka á einum »folkfestival« tann 17. juli. Dagin eftir verður so farið heim aftur við Smyrli. Konsertirnar verða 13 - 16 í tali.

At læra onnur og læra sjálvi

Hugskotið um hesa ferðina stavar frá september mánaða í fjør, og fyrireikingar hava verið í allan vetur. Men hesa seinastu tíðina hevur ein av spælimonnunum, Alistair Cochrane, verið í Orknoyggjunum og Hetlandi og lagt ferðina til rættis og boðað fólkinum har frá henni. Endamálið við ferðini er at læra av spælimonnunum á oyggjunum og gera seg kunnugan við tónleik teirra og kanska eisini læra teir okkurt. Roynt verður eisini at fáa spælimenn úr oyggjunum higar at spæla.

Skiftandi manning

Spælimenninir í Hoydølum hava nú spælt í sløk trý ár. Tað byrjaði við, at Kristian Blak hongdi eina lýsing upp í Studentaskúlanum í Hoydølum. Hann lýsti eftir spælimonnum. Og tað varð skjótt, at nakrir meldaðu seg til. Spælimenninir í Hoydølum hava í royndini verið tríggir bólkar. Í tí fyrsta, veturin 1974-75, høvdu teir eina klarinett við. Tá spældu teir mest danskan tónleik. Síðani gjørdust violinirnar tvær og tónleikurin fyrst og fremst norskur og svenskur. Og í tí síðsta bólkinum, tí núverandi, er tónleikurin svenskur, danskur, norskur, skotskur og shetlendskur. 20% av hvørjum, sigur Kristian Blak. Manningin hevur ikki verið tann sama alla tíðina. Kristian sigur, at tilsamans hava 17 fólk spælt við umframt fleiri, sum hava verið við eitt kvøld. Spælimenninir hava verið væl umtóktir og altíð havt ivaleyst at gjørt. Teir hava spælt um alt landið.

Drúgvasta kvøldið var annað jólakvøld norðuri á Eiði, tá spældu teir frá Kl. 22 til 6. Tey eru summi, sum halda, at vit hava spælt okkum ríkar, men so er kortini ikki, sigur Kristian Blak. Vit hava ikki havt nakran vinning av spælaríinum.

Spælimenninir gevast

Og nú aftaná ferðina á skotsku oyggjunum gevast teir, men møguliga verður byrjað aftur í heyst við eini nýggjari manning. Eg havi biðið vikarin hjá mær, sum hevur spælt í einum spælimannabólki í Danmark, um at hongja eina lýsing upp í Hoydølum, tá skúlaárið byrjar, á sama hátt, sum eg gjørdi fyri trimum árum, sigur Kristian Blak. Tey flestu av teimum, sum hava verið við í vetur, vera burturstødd næsta vetur. Á Skotlandsferðini eru spælimenninir í Hoydølum hesir: Hans Ole, violin og Kristian, klaver, teir eru danskir. Christina og Janne, tey eru svensk og spæla bæði violin. Alistair er skotskur, hann spælir floytu og guitar, Sharon er úr USA, hon spælir floytu. Og tveir føroyingar eru við, Kolbein spælir bass og Ívar guitar. Soleiðis eru fimm tjóðir umboðaðar í Spælimonnunum í Hoydølum hesaferð. **hd**

Tær tríggjar deildirnar

HF

HÆGRI

FYRIREIKINGARPRÓGV

Um tú livir fyri 1 ár,
__ skalt tú planta rís,
um tú livir fyri 10 ár,
__ skalt tú planta trø, men
um tú livir fyri 100 ár,
__ skalt tú útbúgva fólkið.

(Gamalt kinesiskt orðatak)

HF

HF stendur fyir »Hægri fyrireikingar-prógvtøku«.

Rammurnar um HF eru av fyrstan tíð gjørdar við lóg um »højere forberedelses-eksamen« frá 1966. Henda lóg varð síðani broytt í 1973. Kunngerð um hægri fyrireikingarprógvtøku í Føroyum er fyrisett av Føroya Landsstýri, galdandi frá 1. august 1974. Lóg um Føroya Studentaskúla og HF-skeið er frá 23. apríl 1976, har fastsett er, at Føroya Studentaskúli og HF-skeið er stovnur undir landsstýrinum.

HF er nýggjur vegur í undirvísingarlagnum

HF er nýggjur vegur í undirvísingarlagnum og er eitt tilboð til ein og hvønn, sum ynskir víðari útbúgving. Tað vendir sær ikki bert til ung, sum fara úr teimum elstu flokkunum í fólkaskúlanum, men eisini til teirra, sum hava verið styttri ella longri tíð burtur frá skúlanum og komin út í vinnulívið verða var við, at tey hava evni ella hug til at fara undir aðra útbúgving, ella at teimum tørvar kunnleika innan fyri tað starv, tey hava, t.d. mál, kemi, matematikk o.t. Eisini er kanska onkur, sum hevði havt hug at lært okkurt bert av áhuga.



HF er ein prógvtøka

HF er ein prógvtøka.

Tey einastu formellu krøvini, sum sett verða, eru:

1) Tey, ið ætla sær til prógvtøku, skulu hava fylt 18 ár áðrenn 1. februar sama ár, sum prógv verður tikið í fyrstu lærugreinini,

2) og tey skulu melda seg til prógvtøku í teimum lærugreinum, sum tey ætla sær upp í, áðrenn 15. febr. sama ár.

HF er ein prógvtøka, sum kann takast upp á nógvar mátar:
1) Ganga á skeið í 2 ár (hertil krevst forkunnleiki)

2) Sjálvlesandi

3) Einkultfaks-lesandi á skeiði

4) Stuðuls-undirvísing

5) Ein blandingur

Frágreiðing um teir ymsu mátarnar: Sí seinni í hesum bókling.

Full HF-prógvtøka umfatar

Full HF-prógvtøka umfatar nakrar lærugreinir, ið eru felags fyri øll. Umframt hesar lærugreinir skal tann einstaki eftir egnum vali samanseta eitt tal av vallærugreinum, svarandi til í minsta lagi 20 stig (sí seinni) eftir evnum og áhuga. Vællærugreinirnar eru annaðhvørt nakrar av felagslærugreinunum meira gjølla viðgjørdar ella eisini heilt aðrar lærugreinir, nevndar niðanfyri.

Felags-lærugreinirnar eru:

føroyskt	geografi
danskt	matematikk
religión	enskt
søga	týskt
biologi	samfelagsfrøði

Valærugreinirnar eru:

Í parentes eru sett tey stig, sum hvør vallærugreinin telur

BIOLOGI ..... (8)
MATEMATIKK ..... (12)

ENSKT ..... (7)
TÝSKT ..... (10)
SAMFELAGSFRØÐI ..... (6)
3. FREMMANDAMÁL ..... (11)
(Annaðhvørt FRANSKT ella RUSSISKT)
FYSIKK ..... (14)
KEMI ..... (10)
PSYKOLOGI ..... (6)
FISKIVINNA ..... (8)
TÓNLEIKUR ..... (8)
EVNING ..... (8)
ÍTRÓTT ..... (8)
DATALÆRA ..... (6)

Kunngerð

Krøvini í teimum einstøku lærugreinunum eru lýst í kunngerð, sum fæst við at venda sær til rektaran ella ein av teimum 4 lestrarvegleiðarunum (sí seinni) á HF-skeiðinum, sum er í 3 deildum í Føroyum.

Prógvtøka og karakterir

Prógvtøka verður hildin á hvørjum ári í mai-juni, og sjúkaroynd, og í ávísum førum, umroynd í september. Prógvtøka verður hildin í felagslærugreinunum og í teimum vallærugreinum, sum valdar eru.

Karakterir verða givnir eftir 13-stiganum. Fyri at standa fulla HF-prógvtøku krevst minst 5,5 í miðal, og at tveir teir lægstu karakterirnir tilsamans + miðalúrslitið av hinum karakterunum geva minst 13.

Einstakar lærugreinir

HF-prógvtøkan verður ikki — í mun til tað, vit eru von við frá øðrum skúlasystemum — tikin sum eina heild. Hvør einstøk lærugrein kann t.d. takast um aftur 3 ferðir, og prógv kann fáast fyri einstakar lærugreinir.

HF-skeiðið og lestrarvegleiðarar

Sum vit longu nú kunnu síggja, er HF ein ógvuliga liðiligur skúlaformur, men ikki er altíð so lætt hjá fólki at finna út av, hvussu skipanin er, hvussu møguleikarnir eru júst hjá einum sjálvum og mangt annað. Til at vegleiða fólk við hesum eru settir 4 lestrarvegleiðarar við HF-skeiðið í Føroyum, og fólk kunnu tí venda sær til teirra at fáa hjálp viðvíkjandi HF-lestri.

HF-skeiðið í Føroyum er í 3 deildum:

Ein í Hoydølum, ein í Klaksvík og ein í Suðuroy, har hon bæði er í Vági og á Tvøroyri.

Hægri útbúgving er sostatt komin út á bygdirnar.

Hesar deildir eru tó at rokna sum eitt HF-skeið við einum rektara, sum situr í Hoydølum.

HF-deildirnar

Hoydala HF-deild, Hoydalar, 3800 Tórshavn,
Tlf.: 12972 - 12973.
Rektari: Arnbjørn Mortensen
Lestrarvegleiðarar: Gunvør Hoydal og Hans Jákup Debes.

Klaksvíkar HF-deild, 3870 Klaksvík,
Tlf.: 56421,
Lestrarvegleiðari: Johnny Thomsen.

Suðuroyar HF-deild, 3880 Tvøroyri og 3890 Vág,
Tlf.: 71578 á Tvøroyri og 73622 í Vági,
Lestrarvegleiðari: Jóannes Dalsgaard.

Allar tríggjar deildirnar eru javnsettar, t.e. møguleikarnir eru teir somu á øllum 3 plássunum.



Mátarnir, sum HF kann takast uppá

1) ganga á skeiði í 2 ár:

2-ára undirvísing verður bjóðað fólki á trimim plássum í Føroyum. T.e. at fólk eftir at hava fylgt undirvísingini í 2 ár; skuldu kunnað farið til prógvtøku og tikið eitt fult HF-prógv.

Hvørt árið er býtt sundur í 2 lestrarhálvár (semestur), soleiðis at undirvísingin gongur yvir 4 lestrarhálvár eftir fylgjandi skipan:

Tímaskipan fyri HF á skeið

felagslæri-greinar	Talið av tímum um vikuna semestur			
	1.	2.	3.	4.
føroyskt	4	4	4	4
danskt	3	3	3	3
religión	0	0	3	3
søga	3	3	3	3
biologi	3	2	0	0
landalæra	3	2	0	0
matematikk	5	5	0	0
enskt	4	3	4	4
týskt	3	3	0	0
samfelagsfak	2	2	0	0
tónleikur/(evning)	2	2	0	0
fimleikur	2	2	0	0
felagstímar	34	31	17	17
(danskt HF)	30	27	14	14

vallæri-greinar	Talið av tímum um vikuna semestur				
	1.	2.	3.	4.	points-tal
biologi	0	0	4	4	8
fiskivinna	0	0	4	4	8
matematikk	0	0	6	6	12
enskt	0	1	3	3	7
týskt	0	0	5	5	10
samf.	0	0	3	3	6
tónleik.	0	0	4	4	8
fimleik.	0	0	4	4	8
fysikk	0	3	6	5	14
kemi	0	0	5	5	10
psykologi	0	0	3	3	6
3. fr. mál	0	3	4	4	11

Sum tað sæst á omanfyristandandi talvu gongur HF-skeiðið yvir 2 ár, og hvørt árið er býtt upp í 2 lestrarhálvár (semestir), soleiðis at undirvísingin íalt røkkur yvir 4 semestir. Lærugreinirnar umfata eitt rað av felagsfakum, har summi ganga yvir øll 4 semestir, sum t.d. enskt og føroyskt; summi enda aftan á 2. semestur, og aftur summi byrja í 3. semestri og enda aftan á 4. semestur. Hesi felagsfak skulu øll ganga til, men afturat hesum skal næmingurin so velja sær nakrar valgreinar. Hvør valgreinin hevur eitt pointtal, sum er tað samalaða tímatalið um vikuna. Næmingurin skal velja, so hann minst hevur 20 point og helst ikki ov nógv meira enn 30, tí so verður arbeiðið ov stórt. Tó koma ikki altíð allar valgreinar fyri, tí ov fá hava meldað seg til.

HF er ein prógvtøka, so har er einki, ið eitur árskarakterir, ársroyndir, terminsroyndir og tílíkt. Prógvtøka í teimum einstøku lærugreinunum verður hildin í endanum av tí semestri, har undirvísingin í lærugreinunum endar. Eingin prógvtøka er í felagsfakunum tónleikur, evning og ítróttur.

Næmingar, ið ganga á skeið fyri at taka HF-prógv, skulu — umframt fyrrnevndu prøvtøku - lærigreinir - ganga til undirvísing í tónleiki ella evning og ítróttí sum felagslærugreinum; men ongin prøvtøka fer fram í hesum.

Møtiskylda

Næmingar, sum ganga á skeiði, hava møtiskyldu. T.e. tey skulu luttaka í undirvísingini í minsta lagi 80% av tí samanlagda tímatalinum og minst 85% av undirvísingini í teimum einstøku lærugreinunum. Klára tey ikki hetta, kunnu tey burturvísast frá skeiðinum, men hava sum øll onnur rætt til at lesa sjálvi heima og melda seg til prøvtøku.

Lestrarvegleiðing

Lestrarvegleiðararnir skulu geva næmingunum lestrarteknikk og yrkisleiðbeining umframt at vegleiða teir á ymiskan hátt.

Atgongd til skeiðið

Fyri at koma inn á eitt 2-ára fult skeið, eru settar ávísar fyritreytir. Hetta er gjørt, tí at undirvísingin byrjar á einum ávísum stigi, soleiðis at undirvísingin kann gjøgnumførast upp á 2 ár.

Sum ein høvuðsregla kann sigast, at mett verður, um umsøkjarin við tí forkunnleika, hann hevur, kann klára at taka eitt HF-prógv upp á 2 ár, tí annars er ikki nógv vunnið, og ikki er loyvt at ganga um aftur á skeiðinum uttan í undantaksførum.

Í hesum lærugreinum verða sett ávís krøv:

Matematikk: Forkunnleiki í matematikk, sum samsvarar tí, ið krevst til tekniskt fyrireikingarprógv ella royndina eftir 2. real.

Enskt og Týskt: Forkunnleiki í hesum báðum, sum samsvarar tí, ið krevst til 10. floks royndina ella realprógv.

Fysikk: Fysikk kemur bert fyri sum vallærugrein, og tey, sum ætla sær at velja fysikk, skulu hava kunnleika í hesi lærugrein, sum svarar til tað, ið krevst til økt fyrireikingarprógv ella realprógv.

Leggið til merkis, at har stendur »svarandi til«. Hetta merkir, at um fólk á onkran hátt hava útvegað sær henda kunnleika, so er tað líka gott. Vit krevja ongi serstøk prógv. Tað kundi t.d. hugsast, at onkur hevur verið í Onglandi í eini 2 ár ella hevur eina enska mammu, og kann hetta møguliga metast at hava givið nóg mikið av kunnleika í enskum til at uppfylla treytirnar hesum máli viðvíkjandi at sleppa inn.

Men annars kann sigast, at ein 10-ára skúlagongd — á onkran hátt — gevur atgongd, um úrslitið hevur eina ávísa góðsku og uppfyllir treytirnar um kunnleika í teimum fyrrnevndu lærugreinunum.

Men eisini onnur hava atgongd. Fyrr hevur tað verið so, at mangur, ið aftan á lokna skúlagongd, var farin út í vinnulívið, men sum seinni ætlaði at byrja aftur við onkrum øðrum, bókligum, fann vegin stongdan. Hesum kann HF koma til hjálpar. Nøkur ár úti í vinnulívinum kunnu ofta geva búnaskap og evni til sjálvstøðugt arbeiði, sum kunnu vera virðismikil fyri HF-útbúgvingina.



Um onkur hevði havt hug at byrjað á einum HF-skeiði, men ikki hevur tann kravda forkunnleikan, kann hann útvegast á ymsan hátt, og vit ráða fólki til, at tey royna at fáa so góðan forkunnleika sum møguligt, áðrenn tey koma á skeiðið, tí tað er strævið at taka eitt fult HF-prógv upp á 2 ár, og eitt HF-prógv við vánaligum úrsliti hevur ikki tað virðið — hvørki fyri tann einstaka ella onnur — sum tað kundi havt, um grundarlagið hevði verið betri.

Fyrireiking til HF

Fleiri mátar eru at fáa sær forkunnleika til HF:

1) Kvøldskúli:

Í Havn og í Klaksvík eru kvøldskeið, sum geva fyrireiking til HF í teimum lærugreinum, sum forkunnleiki krevst í.

2) Føroya Fólkaháskúli:

Á Føroya Fólkaháskúla kann hesin kunnleiki eisini fáast við at ganga í 1 ár, t.e. fylgja tveimum skeiðum.

3) Fólkaskúli:

Fólk kunnu eisini royna at sleppa inn aftur í fólkaskúlan og ganga eitt ár í 10. flokki ella 3. real.

4) Háskúli í Danmark

Í Danmark geva nógvir háskúlar fyrireiking til HF. Yvirlit yvir hesar háskúlar fæst við at venda sær til HF-skeiðið í Føroyum.

Studningur

Tey, ið ganga á skeiði, kunnu fáa studning frá S.U. (Statens Uddannelsstøtte).

Sjálvlesandi

Nógv eru, sum ikki vilja ella kunnu fylgja undirvísingini á einum skeiði. Hetta kunnu vera fólk, sum arbeiða um dagin, t.d. timburmenn, sjómenn, konur, sum hava smábørn o.s.fr., ella onnur, sum heldur vilja lesa sjálvi. Hesi fólk kunnu venda sær til HF-skeiðið alt árið (frítíðirnar undantiknar) at fáa vegleiðing frá lestrarvegleiðarunum. Tey velja so hvørja ella hvørjar lærugreinir, tey ætla at taka prógv í. So fáa tey gjøgnum lestrarvegleiðararnar samband við faklæ rararnar í teimum lærugreinum, tey kundu hugsa sær at farið undir. Teir geva so upplýsing um hesar lærugreinir, og hvat ið lesast skal til prógvtøkuna. Tey fara síðani heim at lesa. Tá tey halda seg hava lisið nóg mikið, melda tey seg til prógvtøku áðrenn 15. febr. sama árið, sum tey ætla sær upp, aftan á at hava samráðst við faklæ rararnar um uppgevilsir o.a.

So líðandi kann ein so taka lærugreinirnar og á henda hátt taka prógv í øllum teimum lærugreinum, sum krevjast til eitt fult HF-prógv ella bert í teimum, sum hugur og nýtsla er fyri. Prógv verður givið fyri hvørja lærugrein sær, og fólk kunnu fara upp tríggjar ferðir í somu lærugrein, um neyðugt er.

Stuðuls-undirvísing

At taka HF-prógv sum sjálvlesandi er ikki lítið krevjandi. Fyri at stuðla hesum fólkum kann stuðuls-undirvísing møguliga setast á stovn, um nóg nógv melda seg til hetta. Við stuðuls-undirvísing verður undirvíst í 20% av tímatalinum í lærugreinini um kvøldið. Í matematikk kundi hetta verið 3 tímar um vikuna í 10 vikur.

Einkultfaksundirvísing

Á deildunum í Klaksvík og í Suðuroy ber til bæði at ganga til fult HF-skeið og bara til einstakar lærugreinir. Fólk, sum bert hava brúk fyri prógv í summum lærugreinum, kunnu melda seg til hesar lærugreinir og fylgja undirvísingini í teimum. Summi, sum kanska ikki hava umstøður til at taka eitt fult HF-prógv upp á 2 ár, kunnu taka nakrar lærugreinir í senn og á henda hátt — gjøgnum fleiri ár — samla sær eitt fult HF-prógv. Um tey hava minni enn 20 undirvísingartímar um vikuna, fáa tey ongan studning frá S.U.

Tey, ið ynskja at ganga til einstakar lærugreinir, skulu melda seg til, tá ið tilmeldingarfreistin er fyri tey, ið skulu ganga á fullum skeiði, men tilmeldingarfreistin er longri. Hon gongur frá 15. febr. og heilt fram til tað nýggja skúlaárið byrjar.

Í Havn er møguligt at melda seg til einkultfaksundirvísing í vallærugreinunum, av tí at oftast er pláss á holdinum, meðan hetta enn ikki er møguligt í felagslærugreinunum, uttan í ávísum førum, men vit fara at royna at seta undirvísing á stovn í einkultum lærugreinum um kvøldið, so skjótt sum møguleiki verður fyri tí. Nær tað verður, kann tó einki sigast um enn.

Ymiskt

Fólk kunnu taka nakrar lærugreinir sum sjálvlesandi, og fáa tey so seinni umstøður til at ganga í skúla, kunnu tey melda seg til eina av HF-deildunum og taka restina av lærugreinunum á skeiði.

Í Klaksvík og í Suðuroy kunnu fólk taka einstakar lærugreinir á skeiði og samstundis taka aðrar sum sjálvlesandi.

Tey, ið hava tikið fult HF-prógv við einum ávísum tali av vallærugreinum, kunnu sum sjálvlesandi taka aðrar vallærugreinir og á henda hátt víðka um prógvið.

Serskipanir kunnu oftast fáast í lag við at venda sær til HF-skeiðið.

Avgerð um upptøku

Rektarin fyri HF-skeiðið ger av, hvørjir umsøkjarar verða upptiknir á skeiðinum. Henda avgerð verður grundað á eina meting av fakligum og persónligum kvalifikatiónum hjá tí einstaka, og tí verða allir umsøkjararnir bidnir um at koma til eina persónliga samrøðu við rektara og lestrarvegleiðarar.

Generelt kann sigast, at fólk, sum hava verið burtur frá skúlanum og úti í vinnulívinum, hava ein fyrimun fram um tey, sum koma beint úr fólkaskúlanum.

Hvat kann HF-prógvtøkan nýtast til

HF-prógvtøkan gevur atgongd til tær flestu framhaldandi útbúgvingarn, so sum universitetini og aðrar hægri lærustovnar. Í summum førum krevjast ávísar vallærugreinir. HF-prógv — óansæð vallærugreinir — gevur atgongd til læraraskúlarnar. Hf-prógv er serliga vælegnað at halda fram við til millumtekniskar útbúgvingar, tí tað ikki er so teoretiskt sum studentsprógvið.

Upplýsing um nýtslu av HF-prógvtøkuni fæst við at venda sær til HF-skeiðið. T.d. kann nevnast, at summar útbúgvingar ikki krevja fult HF-prógv, men bert prógv í summum lærugreinum.



Annars kann sigast, at av tí at okkara samfelag verður meira og meira kompliserað, verður krevið um útbúgvið fólk eisini størri — kanska serliga á millumteknikkarastiginum, t.d. innan fyri fiskivinnuna — og í hesum føri er HF-skipanin vælegnað, tí hon er so liðilig, og um tørvur verður á tí, kann landsstýrið seta aðrar vallærugreinir á stovn.

Spanskt sum vallærugrein á HF í Hoydølum

Marianne Møller, sum hevur verið lærari við Føroya Studentaskúla og HF-skeið í 2 ár, gevur her eina frágreiðing um vallærugreinina spanskt við HF-skeiðinum, sum hon hevur undirvíst í í 1 1/2 ár:

Pr. 1.1.-76 påbegyndtes et HF-tilvalgskursus i spansk på Føroyar Studenterskúli. Undervisningen skal strække sig over 3 semestre — 2., 3. og 4. semester i HF-forløbet, og timetallet er henholdvis 3 - 4 - 4 om ugen i disse tre semestre.

Formålet med undervisningen er at bibringe eleverne sådanne kundskaber, at de kan læse lettere spanske tekster og føre en elementær samtale på spansk.

I løbet af de 3 semestre skal der læses 150 normalsider, hvoraf man til eksamen skal opgive 65.

Til eksamen får eksaminanden en halv normalside ikke set tekst, der skal oversættes. Vedkommende prøves desuden i oplæsning og samtale på spansk over en halv normalside af de opgivne tekster.

Det har vist sig ved den forsøgsordning i spansk, der i den sidste halve snes år har fundet sted i Danmark, at spansk ikke kan anses for at være sværere end fransk, der er det traditionnelle 3. fremmedsprog i HF- og gymnasieundervisningen, selv om vanskelighederne nok fordeler sig forskelligt i de to sprog. Man vil således i spansk forholdsvis hurtigt kunne opnå en for spansktalende personer forståelig udtale, medens verbalsystemet må anses for at være en kende lettere i fransk end i spansk. Under alle omstændigheder vil såvel fransk som spansk give en værdifuld introduktion til de sproglige mekanismer, der er særegne for romanske sprog i modsætning til germanske.

Denne indføring i romanske sprogs særheder har måske især akademisk interesse og vil næppe af alle kunne opfattes som relevant. Men der er også mere praktiske forhold, der taler for, at spansk i al fald bør være en konstant valgmulighed i HF og i gymnasiet. Således er spansk det mest udbredte af de romanske sprog. I Europa tales der ganske vist kun spansk i Spanien — det giver dog immervæk en klat mennesker, godt 35 millioner — men dertil kommer, at hele den sydlige del af Amerika, fra Mexico til Ildlandet er spanskspoget med undtagelse af Brasilien. Naturligvis er der afvigelser mellem europæisk spansk og amerikansk spansk, ligesom der er forskelle mellem de enkelte landes spansk i Amerika, men med et godt grundlag i europæisk spansk vil man være i stand til at forstå mennesker fra hele dette enorme område og til at læse den fag- og skønlitteratur, der udgives på spansk.

Den spanske skønlitteratur har altid været anerkendt — man behøver blot at tænke på et så monumentalt værk i verdenslitteraturen som Don Quijote — og også i dag skrives der vigtige værker på spansk, men de spansktalende samfund er

også på andre områder kommet ind i en udvikling, der gør, at sproget har stigende betydning for andre studier og — især — for erhverslivet. Man kan i denne forbindelse nævne, at Spanien i 1974 aftog for 52.603.000 kr. varer fra Færøerne og dermed kommer ind på en fin førsteplads blandt de aftagerlande, der ikke er medlemmer af EF. (Årsberetning 1974. Rigsombudsmanden på Færøerne)

Spaniens rolle som turistland er velkendt, og selv om turismen som næringsvej i Spanien ser ud til at være kommet ind i en afmatningsperiode, er der ingen tvivl om, at landet i de kommende år vil gennemgå en udvikling, som det nok vil være interessant at kunne følge på nærmeste hold. Spanien er et rigt land, ikke blot på råstoffer, men også hvad angår unge, veluddannede folk på næsten alle områder. Hvis den påbegyndte liberalisering fortsætter, vil Spanien kunne få ganske meget at skulle hava sagt også i international sammenhæng.

Marianne Møller

Kunngerð um vallærugreinina Fiskivinna á HF-skeiðinum í Føroyum

§ 7.

FISKIVINNA

Endamál

Endamálið við frálæruni er, at næmingarnir fáa kunnleika til tey náttúruviðurskifti og tey samfelagsviðurskifti, sum hava týdning fyri høvuðsvinnuna í Føroyum. Við hesum kunnleika skulu teir vera førir fyri vandnir at meta um upplýsingar um tey viðurskifti, sum hava samband við fiskivinnuna.

Frálæra

Frálæran viðger fiskin og tey viðurskifti, sum ávirka hann, frá hann svimur í havinum til hann fer av landinum sum viðgjørd vøra.

Dentur verður lagdur á at geva kunnleika um, hvussu fiskiskapur og viðgerð verða løgd til rættis á skilabestan hátt.

Harnæst verða evni innan handil og búskap og arbeiðsmøguleikar og -viðurskifti hjá tí fólki, sum starvast í fiskivinnuni, gjølla viðgjørd.

Tað ber til at leggja dent á serligar partar av hesum evnum, so næmingarnir innan ávís øki kunnu fáa praktiskan kunnleika. Møguleiki eigur at vera fyri, at vinna henda praktiska kunnleika við beinleiðis virki innan vinnuna.

Prógvtøka

Prógvtøkan umfatar eina munnliga roynd.

Prógvtøkan kann harafturat umfata eina skrivliga roynd.

Tað tilfarið, ið er lisið og viðgjørt, verður uppgivið.

4 tímar verða givnir til **skrivligu royndina.**

Til **ta munnligu royndina** verður settur 1 spurningur innan fyri tey evni, ið viðgjørd eru, og út frá tilfari, ið hevur verið viðgjørt í frálæruni ella er av sama slagi.

Ein karakterur verður givin út frá einum serkarakteri fyri ta skrivligu royndina og einum serkarakteri fyri ta munnligu royndina. Serkarakterirnir, ið telja líka, verða skrivaðir á prógvskjalið.

§ 8

Henda kunngerð er galdandi frá 1. august 1974.

Føroya Lansstýri, 30. apríl 1976.

Finnbogi Isaksen
landsstýrismaður

grein í Sosialinum 7. juli 76.

HF-næmingar læra um føroyska fiskivinnu

Allir næmingar hava tikið dugnaskapsroynd í sigling

Hetta seinasta árið hevur verið undirvíst í fiskivinnu á HF-skeiðunum í Havn, Klaksvík og í Suðuroy. Umleið 30 næmingar í 2. HF-flokki hava valt hesa lærugrein, sum hevur verið valfrí. Í undirvísingini hevur dentur verið lagdur á at geva næmingunum ein almennan kunnleika um høvuðsvinnu okkara.

Seinasta ár varð farið undir eitt nýtt tiltak á HF-skeiðunum í Havn, Klaksvík og í Suðuroy. Fiskivinna varð sett á stovn sum valfrí lærugrein, og umleið 30 næmingar tóku av hesum tilboði.

Tað er Gunvør Hoydal, lærari við Studentaskúlan, sum hevur lagt undirvísingina til rættis. Hon sigur, at endamálið við hesi lærugrein hevur verið at geva næmingunum ein hollan kunnleika um høvuðsvinnu okkara, sum teir kunnu byggja víðari á, um teir hava hug at fáa sær útbúgving innan fiskivinnuna. Gunnvør Hoydal vónar, at hetta kann eggja næmingunum at fáa sær víðari útbúgving og starv í fiskivinnuni, tí í framtíðini verður óivað neyðugt við meiri útbúgvnum fólki innan fiskaframleiðsluna.

Sum lið í undirvísingini hava allir næmingarnir tikið dugnaskapsroynd í sigling frá sjómannsskúlanum. Men hetta verður broytt, nú farið verður

Gunvør Hoydal

undir næsta royndarárið. Gunnvør Hoydal greiðir frá, at hetta hevur tikið umleið helvtina av tímatalinum, soleiðis at ov lítil tíð hevur verið til at viðgjørt tey ymisku evnini. Komandi ár verður dugnaskapsroyndin ikki ein tvungin partur av undirvísingini, men teir næmingar, sum hava hug til tað, kunnu sjálvir taka hetta prógv uttan fyri skúlatíðina, og fáa hetta goldið av skúlanum, umframt at tað gevur 2 point aftrat teimum 8, sum Fiskivinna annars gevur.

Gott úrslit

Til prógvtøkuna uppgóvu næmingarnir umleið 400 síður, og úrslitið var

gott. Ein konsulentur frá danska direktoratinum fyri studentaskúlar og HF var prógdómari, og hann metti, at innihaldið í lærugreini lá á einum nóg høgum støði.

Gunnvør Hoydal greiðir frá, at komandi ár er ætlanin, at næmingarnir eisini skulu upp til skrivliga prógtøku í hesi lærugrein. Í undirvísingini læra næmingarnir um grundarlagið í náttúruni, hvussu fiskurin verður fiskaður, og um hvussu vit kunnu røkta havið, soleiðis at vit fáa sum mest burtur úr. Síðani læra næmingarnir um framleiðsluna á landi, hvussu søluliðið er uppbygt, og tann fíggjarliga síðan av føroysku fiskivinnuni verður eisini viðgjørd.

Í heyst fara teir HF-næmingar, sum velja sær fiskivinnu, í eina viku bert at arbeiða við hesi lærugrein. Tá verður høvi hjá næmingunum at síggja seg um, so teir betur kunnu skilja, hvussu føroyska fiskivinnan er uppbygt, og hvussu hon starvast.

1976

Fyrsta prógv í fiskivinnu tikið á Tvøroyrar HF-skeiði

Lærugreinin »fiskivinna«, er valgrein hjá HF-næmingunum. Teir hava nú fyrstu ferð í Føroya søgu, og í søguni yvirhøvur, tikið prógv í hesi lærugrein. Allir næmingarnir høvdu góð úrslit.

Næmingarnir vóru 7 í tali. Tað verður í hesi lærugrein serligur dentur lagdur á fiskasløgini, hvussu tey verða veidd, hvar tey halda til, og hvussu tey verða hagreidd.

Tey, ið luku prógv, vóru hesi: Símun Midjord, Finn Jacobsen, Sjúrður Ludvig, Connie Poulsen, Randi Lindenskov (sum síggjast aftast frá vinstru). Í miðjuni síggjast Jaspur Bjarkhamar og Bjarta Vilhelm. Fremst á myndini síggja vit lærarar næminganna Gunvør Hoydal og Prógvdómaran Peter Bencke.

Adrian Dalsá | Alfred Petersen | Bergur Joensen | Per Jacobsen | Maria Andreasen | Leif Olsen

Fiskivinnunæmingar í Klaksvík á kanningarferð við Jens Chr. Svabo mai 1977.

Tey føroysku stílaevnini sum vóru givin til HF-prógtøkuna mai-juni 1977.

Av tí at vit halda, stílaevni nr. 5 vera sera áhugavert, verður hetta tikið við í hesum ársriti.

Føroya Studentaskúli & HF-skeið
HF-prógtøka
mai-juni 1977
Føroyskur stílur

1. Gomul og nýggj táttayrking

2. Fólkaræði og kor tess í heiminum nú á døgum

3. Føroyskur yvirtøkupolitikkur

4. Hjúnarbandið

5. Føroyski málspurningurin lýstur við hjáløgdu tekstum sum grundarlag:

   A. Hans Jacob Debes:
   Nakrir syndafullir tankar um málrøkt. (Tíðindablaðið 1974, nr. 21)

   B. Gunnar Hoydal:
   Málið úr búri. (Tíðindablaðið 1974, nr. 43).

   C. Høgni Debes Joensen:
   Syndafullir tankar og fløktar hugsanir. (14. sept. 1974, nr. 158)

Tekstur A. Hans Jacob Debes: Nakrir syndafullir tankar um málrøkt.
Tíðindablaðið 1974, nr. 21.

Í einum sjálvstøðugum samfelag við einum máli, er sjáldan nakað stríð um mál, hóast ymisk málsjónarmið kunnu koma fram. Tó verður neyvan talan um spjaðing í fólkinum um henda spurningin. Øðrvísi í ósjálvstøðugum londum, har útlendskt vald nýtir fremmant mál, ella har tjóðin liggur í tvíningum málsliga. Har tykist ofta, sum málspurningurin er nærum óloysandi.

Hesi viðurskifti eru tekin um, hvussu grundleggjandi málið er í menniskjuni. Málleys er menniskjan einsamøll og livir ikki í samfelag. Og samband og samfelag við aðrar menniskjur fæst fyrst og fremst við málinum. Harvið verður málið tað mest týðandi amboðið í »kommunikatiónini« millum menniskju. Av hesum fylgir eisini at fullfíggjað kommunikatión krevur eitt fullfíggjað amboð (»instrument«).

Tað, vit plaga at rópa »málrøkt«, er tí ikki uttan týdning, og grundarlagið undir henni nýtist ikki bara at vera tjóðskaparligt; tað kann eins væl vera menniskjaligt.

Ein stórur meinbogi við tí tjóðskaparligu málrøktini er ofta, at hon skoðar ov langt aftur í fortíðina og setur teimum livandi málsligar fyrimyndir, sum eru teimum fremmandar. So fremmandar, at tey livandi ikki vilja kennast við tær og halda fram í einum órøktaðum máli. Soleiðis kann tað væl henda, at tað, ið kallað verður málrøkt, livir í einum heimi fyri seg á lærdum stovnum, meðan ongin leggur í at taka sær av tí máli, sum fólk livir og doyr á, og sum hóast alt er fólksins mál.

Eftir hesar almennu hugleiðingar fari eg nú at loyva mær at nema við nakrar spurningar í sambandi við føroyskt mál og føroyska málrøkt.

Fyri tann, ið hevur við ungdóm at gera, hevur tað í fleiri ár verið týðiligt, at føroyskt mál er í einari broytingartíð. Við teimum broytingum, sum verið hava á øllum samfelagsøkjum og við økingini í sambandinum við umheimin, hevði tað verið ónatúrligt, um málið stóð í stað. Málið má jú kunna avmynda tann veruleika, menniskjan livir í. Tað má kunna laga seg eftir broyttum umstøðum og nýggjum fyribrigdum. Men her er tað, at spurningurin um røkt av málinum tekur seg upp.

Fyrst og fremst av politiskum

grundum eru tvey mál í Føroyum. Eitt, ið er fólksins mál, og eitt, ið umboðar myndugleikar uttan fyri Føroyar, og sum meginparturin av tí, sum lisið verður, er skrivaður á. Hetta er ein veruleiki, um hann so er ynsktur ella ikki.

Tað er greitt, at her er ein málslig avbjóðing, sum ongin kann skúgva frá sær. Hetta ber í sær, at málrøktin verður ein sera týðandi liður í virkseminum fyri at røkja tað amboð, sum menniskjur tala og skriva saman á. Og politiskt í virkseminum fyri at verja høvuðseyðkennið hjá tjóðini.

Tann málsliga niðurbrótingin byrjar í skúlanum, við teimum donsku lærubókunum. Hvør lærari veit, hvussu miðvís hendan niðurbrótingin er, hóast allar royndir at gera hana so lítla sum møguligt. Og hon heldur fram alt lívið, tá eisini onnur mál enn danskt gera vart við seg.

Hvussu skal málrøktin vera undir hesum givnu korum? Eg havi onga lidna loysn; men skal loyva mær nakrar viðmerkingar.

Í øllum arbeiði — og ikki minst vísundaligum — er tað avgerandi at virka út frá veruleikanum, sum hann er, og ikki hvussu onkur kundi ynskt sær at hann var. Sostatt verður tað umráðandi í málrøktini at ganga út frá veruleikanum, sum hann er, t.v.s. frá fólksins natúrliga máli, og ikki frá einum máli, sum ikki er longur. Málið má vera ektað, annars verður kommunikatiónin ikki ektað, og tað má hon kunna vera.

Mær tykir, at ein av høvuðsorsøkunum til, at so lítið er komið burtur úr málrøktini er, at hon hevur skoðað ov langt aftureftir; hevur roynt at skrúvað málið aftur til eitt stig, sum ikki er afturvendandi á. Eg vil halda, at sjálvt eitt snøgt fremmandaorð (um málrøkjararnir hava givið tí kyn og form) ger málinum minni skaða enn eitt nýgjørt, sum kennnist so ómøguligt, at fólk ikki vil taka við tí, ella uppfatar tað sum láturligt. Tað mundi meira komið burtur úr at vart orðatilfarið og máluppbyggingina í tí livandi málinum enn burtur úr vónleysum royndum at gera fólksins mál um.

Hetta seinna fær lætt — og hevur longu fingið — eina sera óhugnaliga avleiðing. Hana, at málið sjálvt klovnar í eitt talað mál, sum fólk upplivir sum natúrligt, og eitt skrivtmál, sum er eitt deytt mál og kenst ónatúrligt. Og tað kann ikki vera endamálið við málrøkt. Tað er niðurbróting.

Samanfatað vil eg sostatt halda, at vit mugu koma burtur frá vanvirðingini fyri tí livandi málinum; at vit í staðin góðtaka, at soleiðis er støðan nú, og so fara at røkja málið út frá hesum viðurkenda veruleika.

Tekstur B. Gunnar Hoydal: Málið úr búri. Tíðindablaðið 1974, nr. 43.

Seinastu hundrað árini hava skrivandi fólk og málvinir í felag stríðst fyri at bjarga málinum og reinsa tað fyri spillu innanífrá so væl sum uttanífrá. Tað eru allar góðar grundir fyri at hava stóra virðing fyri hesum fólkum og teirra stremban at sleppa okkara máli undan tí, sum so nógv minni mál hava

verið fyri: at verða tanlaði so líðandi og síðani gloypt av teimum størru málunum. Missa vit málið, so missa vit okkum sjálvi. Hetta hevur verið loysunnarorðið í stríðnum, og semja man hava verið um hetta sjónarmið ikki bara millum málrøkjararnar, men millum føroyingar yvirhøvur. Stríðið er ikki av, men tað er einki at ivast í longur, at málið er bjargað, tað er uppskrivað og kemur nakar í iva, kann hann spyrja og fáa svar um hetta ella hatta er rætt føroyskt ella skeivt.

Og kortini kemur ein ivi undan viðhvørt: Hvat er tað fyri mál, sum er bjargað og skrásett sum tað rætta? Hvussu ber tað til, at so stór gjógv er ímillum tað mál, sum verður talað, og tað sum verður skrivað? Hans J. Debes kallaði sínar hugleiðingar her í blaðnum um málspurningar fyri syndafullar tankar; bara tað at nema eitt sindur við málsemjuna er næstan sum at synda. Men tað slepst ikki undan, at okkurt er galið, og dagliga koma vit fram á dømi í so máta.

Fyri at nevna bara eitt: Tey brøv, sum verða lisin í barnaútvarpinum hvørt týskvøld. Summi av teimum hava børnini sjálvi skrivað, tað hoyrist á tí ófløkta og líkatil orðalagnum. Men tey flestu eru bronglut, stirvin og við so »rættari« orðing, at tað er týðuligt, at barnið hevur havt okkurt vaksið aftan fyri seg. Síggi fyri mær ræðsluna hjá teimum vaksnu, at tað skal berast út um alt landið, at í teirra húsi duga tey ikki at málbera seg rætt. Úrslitið er, at tað er rætt skúlaføroyskt, sum verður lisið, men brævið er spilt, og børnini, sum lurta, noyðast at sita og hála í foreldrini fyri at fáa tey til at umseta tað til eitt mál, sum tey skilja.

Ræðslan fyri tí góðkenda málinum er so stór, at tað hjá nógvum er eitt ódnartak at fáa tann mest einfalda tankan upp á blað. Øll kenna vit fólk, sum duga at tosa livandi og streymandi, men skulu tey skriva nakað av tí niður, sum tey siga, so eiga tey knappilga einki orð, sita og telgja sum við illa bryndum knívi fyri at fáa tað rætt, men tað fer tað mesta í spønir.

Tað er at undrast á, at tað mál, sum er so ríkt og nýtiligt í tí dagliga, ikki sleppur at fóta sær, okkurt er av lagi, tá ið tað at skriva og tosa sítt egna mál rætt er so stríggið, at tað má gevast yvir til tey serkønu.

Svarið hjá teimum málkønu hevur higartil verið, at um bara tað málfrøðiliga korrekta verður borið nóg ofta fram í skúla, í útvarpi og á prenti, so kemur tað rætta so líðandi inn í gerandismálið. Tað er møguligt, at hetta er leiðin, men tað kundi hugsast, at tað ikki er gerandismálið, sum eigur at broytast, men heldur tann semjan, sum higartil hevur verið, um hvat ið er rætt mál og skeivt. Kanska kundi við føroyskum blivið sum við teimum størru málunum, at tað er rætt, tað sum livir millum fólk.

Hetta eru syndafullir tankar, men viðhvørt er stór gleði í at synda, so lat tað bara verða sagt uppaftur meinari: Tað góðkenda, málfrøðiliga rætta málið er ódemokratiskt, afturhaldandi og kúgandi. Ódemekratiskt tí tað er bara fyri tey fáu, tey sum duga; afturhaldandi tí tað heldur vil hava eitt nýtt í tað, sum er fúnað, enn at síggja nýtt ímillum tað gamla; kúgandi og køvandi tí tað elur ræðslu og samvitskubit hjá teimum sum ikki duga tað til fulnar.

Er tað soleiðis, so er leiðin ikki at kappa høvdið av mállæruni og siga gerið so væl. Beinagrindin í málinum, orðaviðgerð, bending og málreglurnar yvirhøvur skulu sjálvandi lærast og haldast, tí tað er rætt, sum tað hevur verið sagt, at møsn í vøkrum og vælbendum málbúna kemur longur fram enn skilatos í óbendum kloddum. Tað sum ræður um verður at geva tí rúmari ræsur, sum hongur á skrokkinum, orðatilfarið, orðanýtslana og málberingarnar, alt tað sum hevur við persónligar metingar hjá tí einstaka at gera, um hann heldur tað vera føroyskt ella óføroyskt, rætt ella skeivt, ljótt ella vakurt.

Málið er bjargað, og tað er einki at ivast í, at tað nú er somikið sterkt, at tað kann loysast úr hafti, at rúm er fyri at lata tað sleppa úr sínum málsligu sunnudagsklæðum úr sínum vakra búri.

Tekstur C. Høgni Debes Joensen: Syndafullir tankar og fløktar hugsanir. 14. sept. 1974, nr. 158.

Í seinastuni hevur tikið seg upp tjak um málið, og her serliga um skrivtmálið. Hans Jacob Debes hevur í Tíðindablaðnum borið fram syndafullar tankar, sum tikið verður til. Hann skrivar, at tjóðskaparliga málrøktin ofta er ein meinbogi við tað, at hon ofta skoðar ov langt aftur í fortíðina og setir teimum livandi málsligar fyrimyndir, sum eru teimum fremmandar. Fremmandar fyrimyndir — onkur hevur fyri stuttum í føroysku bløðunum umrøtt hetta løgna hugtak. Heldur ikki í hesum sambandi tykist tað serliga beinrakið.

Hans Jacob heldur, at tað hevði verið ónatúrligt, um málið stóð í stað. Fleiri munnu vera samdir við honum í hesum. Bert kann hugsast, at ósemja er um, hvørja leið vit skulu lata tað fara. Hann skrivar, at í øllum arbeiði er tað umráðandi at virka út frá veruleikanum, sum hann er. Illa er hugsandi, at Hans Jacob ivast í, at í málrøktini verður arbeitt út frá hesum veruleika, bæði av honum og øðrum. Men hann átti at vitað eins væl, at í øllum arbeiði av hesum slag verður virkað við tí fyri eyga at røkka á eitt mál. Í slíkum føri er vanligt, at tú arbeiðir við einum ávísum stavnhaldi fyri framman. Tú kannst ikki nýta »veruleikan sum hann er«, sum stavnhald. Orðini hjá Hans Jacobi kunnu út frá hesum bert hava ta avleiðing, at tú ikki fæst við málrøkt. Tú skal tá »lata málið laga seg eftir broyttum umstøðum og nýggjum fyribrigdum«. Ella sagt við ørðum orðum. Tú skal lata standa til.

Hans Jacob vil halda, at sjálvt eitt snøgt fremmandaorð ger málinum minni skaða enn eitt nýgjørt, sum kennist so ómøguligt, at fólk ikki vil taka við tí, ella uppfatar tað sum láturligt. Hvønn skaða ger eitt — í slíkum føri vánaligt — nýgjørt orð? Í einum av grannalondum okkara eru nýgjørd orð eitt vanligt fyribrigdi, sum teir har meta sum eina natúrliga avleiðing av hesum, at tíðirnar støðugt

broytast við støðugt nýggjum fyribrigdum. Har verða nýgjørd orð ikki gjørd til láturs. — ei heldur verður har sjálvt hugtakið nýgjørd orð gjørt til láturs. Teir hava júst sannað tað ónatúrliga í, at málið skuldi staðið í stað. Vit vita øll, at ikki øll nýgjørd orð eru líka heppin — øðrvísi kann tað sjálvsagt ikki vera. Tey nýgjørdu orð, ið ikki eru heppin, verða ikki tikin í nýtslu millum fólk og detta tí burtur aftur, meðan tey, ið eru góð, verða tikin upp í málið, og meira er so ikki um tað. Hugtakið nýgjørd orð verður ofta gjørt til láturs her á landi, og tá serliga millum tey, ið samstundis siga, at málið má laga seg eftir nýggjum fyribrigdum. Flestøll munnu vit minnast, hvussu »ástarleikarúrslitsíleggingarílat«, sum sagt varð at vera nýgjørt orð fyri barnavogn, varð nýtt sum hin mest rámandi próvførsla móti hugtakinum nýgjørd orð. Her kundu so øll síggja, hvussu tápulig hesi orð vóru. — Var slíkt fyndug próvførsla? Vánalig nýgjørd orð detta burturaftur. Hvør tekur skaða av tí?

Fólk, ið hava eina treytaleysa andstygd fyri nýgjørdum orðum, umrøða sjáldan tey góðu nýggju orðini, bert tey vánaligu. Hans Jacob er meinkunnigur við tey gomlu Føroyingatíðindini. Við at lesa tey má hann ferð eftir ferð hava givið gætur, at har finnast vánalig orð, ið ikki longur verða nýtt, orð, sum eru horvin, so hvørt sum góð nýgjørd orð eru upptikin í málið. Vil Hans Jacob nokta fyri, at vit seinastu øldina hava fingið ein hóp av nýgjørdum orðum, sum hava ríkað mál okkara? Eiga hesi orð at verða strikað aftur?

Hans Jacob heldur, at málrøktin í Føroyum hevur fingið ta óhugnaligu avleiðing, at málið sjálvt er klovnað í eitt talað mál, sum fólk upplivir sum nakað náttúrligt, og eitt skrivtmál, sum er eitt deytt mál. Og hetta er, sigur Hans Jacob, niðurbróting. Hesin óhugni, ið Hans Jacob kennir á sær, er ringur at skilja, uttan so, at hann tráar eftir, at vit skulu skriva júst, sum vit tosa. Hans Jacob málber seg ikki illa á føroyskum í talu, men líka so víst er tað, at skuldi hann greitt frá sínum sonevndu syndafullu tankum um málrøkt munnliga, so hevði orðingin ikki verið tann sama sum í greinini. Tað hevði verið hvørt sítt, sjálvsagt. Hvør er førur fyri at skriva, sum hann tosar, ella tosa, sum hann skrivar? Skrivt og tala er hvørt sítt og fer altíð at vera tað. Og so er ikki bert hjá okkum her í Føroyum.

Málburðurin hjá fólki er ymiskur, og væl er tað. Summi málbera seg við tign, summi nýta ein stíl, ið — umenn hann kanska tykist fornur — kann verða sum ein njóting at lesa. Onnur skriva eitt meira einfalt mál. Summi skriva knortlut, meðan onnur skriva leikandi lætt. Er tað vanvirðing av tí »livandi« málinum at nýta orð og stíl, ið fellur rættast hjá tí einstaka? Er tað ætlan Hans Jacobs at hava at fólkum, ið ikki skriva tað »livandi« málið, men sum nýta orðatilfar, sum ikki er vanligt í talumálinum? Annars hevði verið áhugavert at fingið at vita, hvat Hans Jacob skilur við »livandi mál«. Um tað er talumálið, um tað er málið, ið funningsmaðurin, sandoyingurin ella havnarmaðurin nýtir í talu. Rættvísast tykist at viðurkenna, at livandi málið snøgt sagt fevnir um alt, ið verður tosað og skrivað í Føroyum í dag,

meðan tað deyða málið ikki kann definerast enn.

Deytt er málið tá fyrstani, tá ið vit her á landi ikki longur nýta føroyskt í talu og skrivt. Og lata vit standa til, fer tað kanska eisini at eydnast hjá Hans Jacob um eini fimti ár at gera nakrar syndafullar tankar um tað deyða føroyska málið.

Rektarin
rættir
studentunum
prógv
1977

pisufundur
í
plantaguni
fyri
HF-næmingum
og studentum



Finn Terji Samuelsen
heldur røðu fyri
næmingarnar
í plantaguni
1977

6. apríl 1976 varð samtykt í Løgtinginum at yvirtaka ta pedagogisku ábyrgdina av Føroya Studentaskúla og HF-skeið.

Nr. 20 23. apríl

Løgtingslóg

um

Føroya Studentaskúla

og HF-skeið

Samsvarandi samtykt Føroya løgtings staðfestir og kennger løgmaður hesa løgtingslóg:

§ 1.

Føroya Studentaskúli og HF-skeið er stovnur undir landsstýrinum.

2. stk. Eftir avgerð landsstýrisins kunnu deildir av Føroya Studentaskúla og HF-skeiði setast á stovn.

3. stk. Landsstýrið og ríkismyndugleikarnir kunnu gera avtalu um, at partur av útreiðslunum til hf-skeiðið verður at gjalda av ríkiskassanum.

§ 2.

Landsstýrið setir rektara. Rektarin hevur dagligu leiðsluna um hendi og stendur landsstýrinum til svars fyri frálæruni.

§ 3.

Landsstýrið setir og loysir úr starvi lærarar í samráð við rektaran.

Lagtingslov

om

Færøernes gymnasium

og HF-kursus

I overenstemmelse med vedtagelse af Færøernes lagting stadfæster og kundgør lagmanden følgende lagtingslov:

§ 1.

Færøernes gymnasium og HF-kursus er en institution under landsstyret.

Stk. 2. Efter landsstyrets afgørelse kan der oprettes afdelinger af Færøernes Gymnasium og HF-kursus.

Stk. 3. Landsstyret og rigsmyndighederne kan slutte aftale om, at en del af udgifterne til hf-kurset afholdes af statskassen.

§ 2.

Landsstyret ansætter rektor. Rektor har den daglige ledelse og er ansvarlig for undervisningen over for landsstyret.

§ 3.

Landsstyret ansætter og afskediger lærere i samråd med rektor.

§ 4.

Landsstýrið setir eitt studentaskúla- og hf-ráð, sum landsstýrisins vegna hevur ta dagligu pedagogisku og fakligu ábyrgdina av frálæruni v.m.

2. stk. Ráðið hevur 3 limir: 1 umboðandi landsstýrið, 1 umboðandi studentaskúlan og hf-skeiðið og 1 uttan fyri nevndu stovnar, men við kunnleika til studentaskúla- og hf-frálæru.

Limirnir verða valdir fyri 3 ár og soleiðis, at ein limur fer frá hvørt ár, fyrstu ferð við lutakasti. Limirnir kunnu verða afturvaldir. Ráðið skipar seg sjálvt.

3. stk. Ráðið hevur hesar uppgávur:

a. eftirlit við frálæruni í hvørjari einstakri lærugrein og við prógvtøku-uppgevingunum.
b. ásetan um nær prógvtøkuhald verður.
c. setan av uppgávunevnd at gera uppgávurnar til tær skrivligu royndirnar.
d. tilnevnan av prógvdómarum til tær munnligu og skrivligu royndirnar.
e. støðutakan viðvíkjandi burturvísing úr skúlanum/skeiðinum.
f. fylgja við gongdini í hægri frálæru í grannalondum og borga fyri, at tey føroysku students- og hf-prógvini kunnu javnmetast við tilsvarandi prógv í hesum londum.

§ 5.

Landsstýrinum verður heimilað við kunngerð at seta gjøllari reglur til fremjingar av lógini.

§ 4.

Landsstyret nedsætter et gymnasieskole- og hf-nævn, som på landsstyrets vegne har det daglige pædagogiske og faglige ansvar for undervisningen m.m.

Stk. 2. Nævnet har 3 medlemmer: 1 repræsenterende landsstyret. 1 repræsenterende gymnasieskolen og hf-kurset og 1 uden for nævnte institutioner, men med kendskab til gymnasieskole- og hf-undervisning.

Medlemmerne vælges for 3 år og således, at et medlem udgår hvert år, første gang ved lodtrækning. Medlemmerne kan genvælges. Nævnet konstituerer sig selv.

Stk. 3. Nævnet har følgende opgaver:

a. tilsyn med undervisningen i hvert enkelt fag og med eksamensopgivelserne.
b. fastsættelse af hvornår eksamen afholdes.
c. udnævnelse af opgavekommission, som udarbejder de skriftlige opgaver.
d. udnævelse af censorer til de mundtlige og skriftleg prøver.
e. stillingtagen vedrørende bortvisning fra gymnasiet/kurset.
f. følge udviklingen inden for højere undervisning i nabolandene og være garant for, at de færøske studenter- og hf-eksamensbeviser kan sidestilles med tilsvarende beviser i disse lande.

§ 5.

Landsstyret bemyndiges med bekendtgørelse at sætte nærmere regler til lovens gennemførelse.

§ 6.

Henda lóg fær gildi beinan vegin, reglurnar um hf-skeiðið tó frá 1. august 1974.

§ 6.

Denne lov træder i kraft straks, reglerne om hf-kurset dog den 1. august 1974.

Tórshavn, 23. apríl 1976.
Finnbogi Isaksen (sign.)
varaløgmaður

Dánjal P. Danielsen (sign.)

Nr. 21. 23. apríl

Løgtingslóg
um
studentsprógvtøku

Samsvarandi samtykt Føroya løgtings staðfestir og kunnger løgmaður hesa løgtingslóg:

§ 1.

Studentsprógv, sum verður tikið aftaná framhaldandi alment mennandi frálæru í trimum flokkum uppá eitt ár hvør, skal tryggja neyðuga grundarlagið fyri at byrja víðari lesnað á universitetum og øðrum hægri lærustovnum.

§ 2.

Frálæran til studentsprógv fer fram í deildum, sum fyri ein part hava ymist innihald og verða nevndar eftir teimum lærugreinum, sum geva hvørjari einstakari deild sítt sermerki.

2. stk. Ymist eftir teimum einstøku deildunum skal frálæran umfata lærugreinirnar
átrúnað

Lagtingslov
om
studentereksamen

I overensstemmelse med vedtagelse af Færøernes lagting stadfæster og kundgør lagmanden følgende lagtingslov:

§ 1.

Studentereksamen, som aflægges efter en fortsat almendannende undervisning gennem tre etårige klasser, skal sikre tilstedeværelsen af det nødvendige grundlag for videregående studier ved universitet og andr højere læreanstalter.

§ 2.

Undervisningen til studentereskamen gives på delvis forskellige linjer, som benæves efter de fag, der giver hver enkelt linje dens særpræg.

Stk. 2. Forskelligt efter de enkelte linjer skal undervisningen omfatte
fagene
religion

føroyskt við íslendskum
danskt við norksum og svenskum
enskt
týskt
franskt
latín
fornaldarfrøði
søgu
landalæru
lívfrøði/lívvirkisfrøði
alisfrøði og evnisfrøði
støddfrøði
ítrótt og
tónleik

Harafturat verður givið næmingunum yrkisleiðbeining.

3. stk. Landsstýrið kann áseta reglur fyri frálæru í øðrum lærugreinum enn teimum, sum eru nevndar í 2. stk.

4. stk. Næmingar, ið hoyra ikki til fólkakirkjuna, sleppa eftir áheitan heilt ella lutvíst undan at luttaka í frálæruni í átrúnaði. Er næmingurin undir foreldramyndugleika, kann hann bert sleppa undan frálæruni við góðkenning frá tí, sum hevur foreldramyndugleikan.

§ 3.

Frálæra til studentsprógv verður givin á Føroya Studentaskúla og HF-skeiði.

§ 4.

Rektarin tekur avgerð um upptøku av næmingum, sum vanliga bert fer fram við byrjanina av skúlaárinum, og sum er treytað av:

1. At næmingur hevur fylt ella fyllir 16 ár innan 1. februar árið eftir upp-

færøsk med islandsk
dansk med norsk og svensk
engelsk
tysk
fransk
latin
oldtidskundskab
historie
geografi
biologi/fyriologi
fysik og kemi
matematik
legemsøvelser og
musik

Herudover gives der eleverne erhversorientering.

Stk. 3. Landsstyret kan fastsætter regler om undervisning i andre fag end dem, der er nævnt i stk. 2.

Stk. 4. elvever, der ikke tilhører folkekirken, fritages efter anmodning helt eller delvis for undervisningen i religion. Er eleven undergivet forældremyndighed, kan fritagelse kun ske med samtykke fra dennes indehaver.

§ 3.

Undervisningen til studentereskamen gives på Færøernes Gymnasium og HF-kursus.

§ 4.

Rektor træffer afgørelse om elevers optagelse, som i almindelighed kun kan finde sted ved begyndelsen af skoleåret, og som er betinget af:

1. At eleven har fyldt 16 år inden 1. februar året efter optagelsen, og at

tøkuna, og at aldur hansara ikki við meira enn tveimum árum fer upp um miðalaldurin í tí flokki, sum hann eftir kunnleikum sínum kann upptakast í.

2. At næmingurin leggur fram prógv fyri, at hann hevur staðið atgonguroyndina til studentaskúlan aftaná 9. ella eitt seinni skúlaár við nóg góðum úrsliti, og at hann hevur sovorðna búning og kunnleika, at hann verður hildin førur at fylgja frálæru studentaskúlans á nóg góðan hátt og gera lesnaðin lidnan til vanliga tíð.
3. Næmingar, ið tilmelda seg 1. studentaskúlaflokk á málsligu deild skulu standa eina roynd í latíni, sum landsstýrið ásetir nærri reglur um.

4. Næmingar, ið ynskja upptøku seinni enn við byrjanina av 1. studentaskúlaflokki, og næmingar, ið hava ikki staðið atgonguroynd aftaná 9. ella eitt seinni skúlaár, skulu standa upptøkuroynd á studentaskúlanum, sum vísir, at teir í búning og kunnleika standa mát við næmingarnar í tí flokkinum, teir ynskja at verða upptiknir í.

2. stk. Landsstýrið ásetir reglur um, nær upptøka í 1. studentaskúlaflokk er treytað av, at næmingurin stendur upptøkuroynd á studentaskúlanum, og nær ein næmingur, sum verður ikki hildin at lúka treytirnar viðvíkjandi búning og kunnleika til upptøku í 1. studentaflokk, skal kunnu krevja, at

alderen ikke med mere end to år overstiger gennemsnitsalderen i den klasse eleven efter sine kundskaber kan optages i.

2. At eleven fremlægger bevis for, at han med tilfredsstillende resultat har bestået adgangsprøven til gymnasieskolen efter 9. eller et senere skoleår, og at han er i besiddelse af en sådan modenhed og kundskabsfylde, at det kan forventes, at han kan følge undervisningen på normal tid.

3. Elever, der melder sig til 1. gymnasieklasse på sproglig linie, skal bestå en prøve i latin, som landsstyret fastsætter de nærmere regler om.
4. Elever, der ønsker optagelse senere end ved 1. gymnasieklasses begyndelse, og elever, som ikke har bestået adgangsprøven til gymnasieskolen efter 9. eller et senere skoleår, må bestå en optagelsesprøve på gymnasieskolen, der viser, at de i modenhed og kundskaber står på samme trin som eleverne i den klasse, hvori de ønsker at blive optaget.

Stk. 2. Landsstyret fastsætter regler om, i hvilke tilfælde optagelse af en elev i 1. gymnasieklasse skal kunne betinges af, at eleven består en optagelsesprøve på gymnasieskolen, og i hvilke tilfælde en elev, som ikke anses for kvalificeret til optagelse til 1. gymnasieklasse, skal kunne forlange

upptøkuroynd verður hildin á studentaskúlanum.

3. stk. Landsstýrið kann í serstøkum førum gera undantak frá frammanfyri standandi reglum.

4. stk. Hann, ið ynskir at taka studentsprógv, men sum ikki lýkur treytirnar fyri at verða innstillaður sum skúlanæmingur, kann fara upp til eina prógvtøku, sum tað 3-mannaráðið, sum landsstýrið velur eftir løgtingslóg um Føroya Studentaskúla og HF-skeið, skipar fyri.

optagelsesprøve afholdt på gymnasieskolen.

Stk. 3. Landsstyret kan i særlige tilfælde meddele undtagelsen fra foranstående regler.

Stk. 4. Den, der ønsker at gå op til studentereksamen, men som ikke opfylder betingelserne for at blive indstillet som skoleelev, kan gå op til en eksamen, som det 3-mandsnævn, som landsstyret nedsætter i medfør af lagtingslov om Færøernes Gymnasium og HF-kursus, lader afholde.

§ 5.

Tá næmingur fer úr skúlanum, gevur skúlin honum ummæli um búning, kunnleika og onnur viðurskifti í skúlanum, um hann krevur hetta.

§ 5.

Når en elev forlader skolen, meddeler skolen ham vidnesbyrd om medenhed, kundskab og øvrige forhold i skolen, såfremt han forlanger dette.

§ 6.

Landsstýrið skipar fyri studentsprógvtøku.

2. stk. Til studentsprógvtøkuna skulu næmingarnir prógva, at teir hava ta búning og tann kunnleika, sum er endamálið við frálæruni.

3. stk. Til prógvtøkuna verða havdar skrivligar og munnligar royndir við prógvdómarum, ið verða tilnevndir av tí 3-mannaráði, sum landsstýrið tilnevnir eftir løgtingslóg um Føroya Studentaskúla og HF-skeið. Tær munnligu royndirnar eru almennar.

4. stk. Prógv verða latin eftir gjøllari reglum, sum verða ásettar av landsstýrinum.

§ 6.

Landsstyret lader studentereksamen afholde.

Stk. 2. Ved studentereksamen skal eleverne godtgøre, at de har den modenhed og de kundskaber, der er sat som undervisningsmål.

Stk. 3. Ved eksamen afholdes der skriftlige og mundtlige prøver med censorer, der beskikkes af det 3-mandsnævn, der nedsættes af landsstyret i medfør af lagtingslov om Færøernes Gymnasieskole og HF-kursus. De mundtlige prøver er offentlige.

Stk. 4. Der uddeles bevis for eksamen efter nærmere bestemmelser, der fastsættes af landsstyret.

§ 7.

Landsstýrið ásetir gjøllari reglur fyri

a. frálæru til studentsprógv, heruppií fyri deildarbýti og fyri innihald og vídd av tí einstøku lærugreinini og hvar á deildunum frálæra í henni verður givin.
B. prógvtøkuhaldi og krøvum í teimum einstøku lærugreinunum til prógvtøkuna.
c. dugnameti og prógvdómi.

2. stk. Landsstýrið kann góðkenna frávik frá reglunum í hesi lóg um frálæruskipanina sum lið í einum royndararbeiði treytað av, at hetta hevur ikki við sær, at møguleikar næminganna at nýta studentsprógv teirra sum grundarlag fyri víðari lesnað ella fyri rættindi í aðrar mátar verða skerdir.

§ 8.

At verða settur í starv sum adjunktur, lektari ella rektari við studentaskúlan er treytað av, at umsøkjarin innanfyri lærugreinir studentaskúlans hevur lokið kandidatsprógv á universiteti ella magistaraprógv, tó kunnu umsøkjarar, sum hava lokið annað endaligt prógv á universiti ella hægri lærustovni ella á annan hátt hava fingið tørvandi útbúgving, verða settir í hesi størv, tá ið umstøðurnar tala fyri hesum.

2. stk. Setan í fast starv sum lærari við studentaskúlan er treytað av, at

§ 7.

Landsstyret fastsætter nærmere regler om

a. undervisning til studentereksamen, herunder om linjedeling og om de enkelte fags indhold, omfang og placering på de forskellige linjer,

b. eksamenafholdelse og fordringer i de enkelte fag ved eksamen,

c. karaktergivning og censur.

Stk. 2. Landsstyret kan godkende afvigelser fra denne lovs bestemmelser om undervisningens ordning som led i forsøgsarbejde betinget af, at dette ikke medfører, at elevernes muligheder for at gøre brug af deres studentereksamen som grundlag for videregående studier eller for rettigheder i anden henseende forringes.

§ 8.

Der er en betingelse for ansættelse som adjunkt, lektor eller rektor ved gymnasieskolen, at vedkommende indenfor gymnasieskolens fagkreds har bestået kandidatseksamen ved universitet eller har taget magisterkonferens, dog kan ansøgere, der har bestået anden afsluttende eksamen ved universitet eller højere læreanstalter eller på anden måde har gennemført tilstrækkelig uddannelse, ansættes i disse stillinger når omstændighederne taler for det.

Stk. 2. Varig ansættelse som lærer ved en gymnasieskole er betinget af, at den

avvarðandi hevur staðið roynd í teoretiskum og praktiskum pedagogikki.

3. stk. Landsstýrið kann áseta nærri reglur um royndina, heruppií um undantøk frá hesi í serligum førum.

§ 9.

Henda lóg fær gildi beinan vegin.

2. stk. Samstundis fer úr gildi Kgl. fyriskipan nr. 350 frá 14. december 1964 fyri Føroyar »om gymnasieskoler«, tó soleiðis, at reglurnar um realdeild studentaskúlans hava gildi, til realdeildin er heilt avtikin við endan av skúlaárinum 1975/76.

3. stk. Landsstýrið kann áseta nærri reglur um, n.r og hvussu lógin fær gildi.

4. stk. Tær kunngerðir v. m., sum eru í gildi sbrt. kgl. fyriskipan nr. 350 frá 14. december 1964, hava framvegis gildi við teimum broytingum, sum gjørdar eru við hesi lóg, til landsstýrið ger nýggjar kunngerðir.

pågældende har bestået en prøve i teoretisk og praktisk pædagogik.

Stk. 3. Landsstyret kan fastsætte nærmere regler om prøven, herunder om fritagelse fra denne i særlige tilfælde.

§ 9.

Denne lov træder i kraft straks.

Stk. 2. Samtidig ophæves Kgl. anordning nr. 350 af 14. december 1964 for Førøerne om gymnasieskoler, dog således at reglerne om gymnasieskolens realafdeling forbliver i kraft, til realafdelingen er helt afviklet med udgangen af skoleåret 1975/76.

Stk. 3. Landsstyret kan fastsætte nærmere ikrafttrædelse- og overgangsregler.

Stk. 4. De bekendtgørelser m.v., der er gældende i medfør af kgl. anordning nr. 350 af 14. december 1964, forbliver i kraft med ændringer, der følger af denne lov, til landsstyret udsteder nye bekendtgørelser.

Tórshavn, 23. apríl 1976.
Finnbogi Isaksen (sign.)
varaløgmaður

Dánjal P. Danielsen (sign.)

Løgtingslóg
um
hægri fyrireikingarprógvtøku

Samsvarandi samtykt Føroya løgtings staðfestir og kunnger løgmaður hesa løgtingslóg:

§ 1.

Hægri fyrireikingarprógv skal tryggja at tað fakliga grundarlagið og aðrar almennar fyritreytir, ið eru neyðugar fyri at byrja víðari útbúgving eru til staðar.

§ 2.

Frálæran til hægri fyrireikingarprógv kann umfata lærugreinirnar
átrúnað
føroyskt
danskt
søgu
samfelagslæru
fiskivinnu
lívfrøði
landalæru
støddfrøði
alisfrøði
evnisfrøði
enskt
franskt
russiskt
týskt
sálarfrøði
tónleik
evning og
ítrótt.

Lagtingslov
om
højere forberedelseseksamen

I overenstemmelse med vedtagelse af Færøernes lagting stadfæster og kundgør lagmanden følgende lagtingslov:

§ 1.

Højere forberedelseseksamen skal sikre tilstedeværelsen af det faglige grundlag og de øvrige almene forudsætninger, der er nødvendige for at påbegynde videregående uddannelser.

§ 2.

Undervisningen til højere forberedelseseksamen kan omfatte fagene
religion
færøsk
dansk
historie
samfundsfag
fiskerierhverv
biologi
geografi
matematik
fysik
kemi
engelsk
fransk
russisk
tysk
psykologi
musik
formning og
idræt.

Tann einstaka lærugreinin er antin felags fyri allar næmingar (felagslærugrein) ella harafturat ella einans vallærugrein hjá tí einstaka næminginum. Frálæran umfatar allar felagslærugreinir, men fyribils bert eitt avmarkað tal av vallærugreinum soleiðis at talið av vallærugreinum verður víðkað eftir tørvi og praktiskum møguleikum.

2. stk. Landsstýrið kann avgera, um tað skulu verða fleiri lærugreinir.

3. stk. Næmingar, ið hoyra til eitt trúarfelag uttanfyri fólkakikjuna, sleppa eftir áheitan undan at luttaka í frálæruni í átrúnaði. Er næmingurin undir foreldramyndugleika, kann hann bert sleppa undan frálæruni við góðkenning frá tí, sum hevur foreldramyndugleikan.

§ 3.

Frálæran til hægri fyrireikingarprógv verður givin á Føroya Studentaskúla og HF-skeiði.

§ 4.

Landsstýrið skipar fyri prógvtøku til hægri fyrireikingarprógv.

2. stk. Ein treyt fyri at fara upp til prógvtøku er, at viðkomandi hevur fylt 18 ár innan 1. februar tað árið, tá prógvtøkan er. Landsstýrið kann áseta nærri reglur um undantøk í serstøkum førum frá hesi treyt.

3. stk. Aðrar treytir fyri at fara upp til prógvtøku verða ásettar av landsstýrinum. Tað kann ikki setast sum treyt, at

Det enkelt fag er enten fælles for alle elever (fællesfag) eller tillige eller alene tilvalgsfag for den enkelte elev. Undervisningen omfatter alle fællesfag men indtil videre kun et begrænset udbud af tilvalgsfag, idet rækken af tilvalgsfag udvides efter behov og praktiske muligheder.

Stk. 2. Landsstyret kan afgøre om der skal være yderligere fag.

Stk. 3. Elever, der tilhører et trossamfund uden for folkekirken, fritages efter anmodning for at deltage i undervisningen i religion. Er eleven undergivet forældremynighed, kan fritagelse kun ske med samtykke fra dennes indehaver.

§ 3.

Undervisningen til højere forberedelseseksamen gives på Føroya Studentaskúli og HF-skeið.

§ 4.

Landsstyret lader højere forberedelseseksamen afholde.

Stk. 2. Der er en betingelse for at indstille sig til eksamen, at den pågældende er fyldt 18 år inden den 1. februar i det år, eksamen finder sted. Landsstyret kan fastsætte nærmere regler om undtagelse i særlige tilfælde fra denne betingelse.

Stk. 3. De øvrige betingelser for at indstille sig til eksamen fastsættes af landsstyret. Det kan ikke fastsættes

viðkomandi hevur fylgt frálæruni til hægri fyrireikingarprógv.

§ 5.

Prógvtøkan umfatar tær lærugreinir, sum frálært verður í sambært § 2, tó ikki lærugreinirnar tónleik, evning og ítrótt sum felagslærugreinir.

2. stk. § 2. 3. stk. verður nýtt á sama hátt, soleiðis at sleppast kann undan prógvtøku í átrúnaði.

§ 6.

Til prógvtøkuna verða havdar skrivligar og munnligar royndir við prógvdómarum, ið verða tilnevndir av tí 3-manna ráði, sum landsstýrið tilnevnir eftir løgtingslóg um Føroya Studentaskúla og HF-skeið. Tær munnligu royndirnar eru almennar.

2. stk. Prógv verða latin eftir gjøllari reglum, sum verða ásettar av landsstýrinum.

§ 7.

Landsstýrið ásetir gjøllari reglur fyri

a) frálæru til hægri fyrireikingarprógv, herundir innihald og vídd av tí einstøku lærugreinini, hvørjar lærugreinir eru felagslærugreinir, og hvørjar haraftrat ella einans eru vallærugreinir, eins og minsta tal av vallærugreinunum til prógvtøkuna,

b) prógvtøkuhaldi og krøvum í teimum einstøku lærugreinunum til prógvtøkuna,

som betingelse, at den pågældende har fulgt undervisningen til højere forberedelseseksamen.

§ 5.

Eksamen omfatter de fag, der undervises i efter § 2, med undtagelse af fagene musik, formning og idræt som fællesfag.

Stk. 2. § 2, stk. 3. finder tilsvarende anvendelse med hensyn til fritagelse for prøve i religion.

§ 6.

Ved eksamen holdes skriftlige og mundtlige prøver med censorer, der beskikkes af det 3-mands nævn, som nedsættes i medfør af lagtingslov om Færøernes Gymnasium og HF-kursus. De mundtlige prøver er offentlige.

Stk. 2. Der udstedes bevis for eksamen efter nærmere bestemmelse, der fastsættes af landsstyret.

§ 7.

Landsstyret fastsætter nærmere regler om

a) undervisningen til højere forberedelseseksamen, herunder de enkelte fags indhold og omfang, hvilke fag der er fællesfag, og hvilke fag der tillige eller alene er tilvalgsfag, samt mindstefordringen med hensyn til antallet af tilvalgsfag for den enkelte elev,

b) eksamens afholdelse og fordringer i de enkelte fag ved eksamen,

c) dugnameti og prógdómi.

§ 8.

Henda lóg er galdandi frá 1. august 1974.

2. stk. Hægri fyritreikingarprógvtøka verður havd fyrstu ferð á sumri 1976.

c) karaktergivning og censur.

§ 8.

Denne lov har virkning fra den 1. august 1974.

Stk. 2. Højere forberedelseseksamen afholdes første gang sommeren 1976.

Tórshavn, 23. apríl 1976.

Finnbogi Isaksen (sign.)

varaløgmaður

Dánjal P. Danielsen (sign.)

Deildin í Hoydølum

Óli Breckmann:	Enskt, Latín	
Kirstin Brix:	Týskt	
Hans Jákup Debes:	Enskt, Søga, Fornaldarfrøði	
Jákup í Gerðinum:	Matematikk	
Kjell Gravdal:	Matematikk, Fysikk	
Gunvør Hoydal:	Biologi, Fiskivinnu	
Hellen Heinesen:	Danskt	(ferða-lærari)
Jette Hoydal:	Enskt, Franskt	
Ásmundur Johannesen:	Føroyskt, Fimleik	
Elin Johannesen:	Fimleik	
Petra Himmelstrup:	Fimleik	
Inger Flø Jørgensen:	Kemi	
Hans Ole Larsen:	Danskt	
Arnbjørn Mortensen:	Enskt	
Marianne Møller Hansen:	Franstk, Spanskt	
André Niclasen:	Týskt	
Kristian Black Nielsen:	Musikk, Franskt	
Mortan Nolsøe:	Føroyskt	
Palle Nielsen:	Fysikk, Matematikk	
Jákup Thorsteinsson:	Søga, Danskt	
Johnny Thomsen:	Russiskt	(ferða-lærari)
Erik Petersen:	Føroyskt	
Claus Reistrup:	Danskt	
Annfinnur Skaale:	Enskt, Søga, Fornaldarfrøði	
Eyðun Sørensen:	Musikk, Enskt, Sang	
Hanus Samuelsen:	Føroyskt	
Rólant í Skorini:	Religión, Franskt, Fornaldarfrøði	
Ulf Timmermann:	Týskt, Latín	
Henriette Svenstrup:	Matematikk, Fysikk	
Mads Winther:	Matematikk, Fysikk	
Zacharias Wang:	Samfelagslæra	
Carl Åge Hesselberg:	Biologi, Geografi	
Jens Hæstrup:	Biologi, Geografi	(ferða-lærari)
Alex Kons:	Religión, Latín	
Aksel Tórgarð:	Religión, Latín	
Poul Pølsgård:	Datalæra	
Eyðun Joensen:	Psykologi	
Jørleif Kúrberg:	Fimleik	
Hanne Jacobsen:	Danskt, Týskt	

Í 1976 gjørdust teir báðir: Eyðun Sørensen og Jákup í Gerðinum Lektorar.

Rektarin Arnbjørn Mortensen

Mads Winther og Palle Nielsen

Hanne

Hanus Samuelsen

Claus Reistrup

Jette Hoydal

Hans Jákup Debes

Eyðun Sørensen

Gunvør Hoydal

Jákup í Gerðinum

Rólant í Skorini

Alex Kons

Deildin í Klaksvík

Johnny Thomsen:	Enskt	
Hellen Heinesen:	Danskt	
Hans David Matras:	Føroyskt	
Agnar á Dul:	Samfelagsfak, hjá-lærari í søgu	
Hans Jákup Debes:	Stuðuls-lærari í søgu	(ferða-lærari)
Christoffer Jensen:	Hjá-lærari í geografi	
Katrin Thomassen:	Stuðuls-lærari í geografi	(ferða-lærari)
Kirstin Brix:	Týskt	(ferða-lærari)
Gunvør Hoydal:	Fiskivinna	(ferða-lærari)
Carl-Åge Hesselberg:	Biologi og hjá-lærari í psykologi	(ferða-lærari)
Eyðun Joensen:	Stuðuls-lærari í psykologi	(ferða-lærari)
Símun Pauli Konoy:	Matematikk, fysikk	
Jákup Magnussen:	Religión	
Henning Bøgesvang:	Latín	
Kristian Black Nielsen:	Franskt	(ferða-lærari)
Jakobina Joensen:	Fimleik	
Poul Nolsøe:	Fimleik	

Deildin í Suðuroy

Jóannes Dalsgaard:	Søga, samfelagsfak	
Jens Hæstrup:	Biologi, geografi stuðuls-lærari í geografi	
Óli Holm:	Hjá-lærari í geografi	
Poul Erik Smedemark:	Matematikk, Fysikk	
Heri Mørkøre:	Kemi	
Uffe Grøn:	Enskt	
Mannbjørn Mortensen:	Enskt, ítróttur	
Lis Helmer Larsen:	Danskt	
André Niclasen:	Týskt	(ferða-lærari)
Eyðun Joensen:	Psykologi	(ferða-lærari)
Gunvør Hoydal:	Fiskivinna	(ferða-lærari)
Martin Restorff:	Religión	

Nakrir av lærarunum við HF í Klaksvík

Johnny

Hellen

Agnar

Christoffer

Símun Pauli

Kirsten (ferðalærari)



Week-endfundur í Suðuroy

Í november skipaði Suðuroyar HF-deild fyri einum week-end fundi, har ymiskt viðvíkjandi HF-skeiðinum varð viðgjørt. Úr Hoydølum luttóku lærararnir Jákup í Gerðinum, André Niclasen og Gunvør Hoydal. Úr Suðuroy luttóku allir lærararnir og vald umboð fyri næmingarnar. Hetta var ein sera áhugaverdur fundur, har tjak fór fram um t.d. framtíðina hjá HF í Suðuroy. Allan leygardagin varð arbeitt í bólkum, og hetta endaði við einum felagstjaki.

Um kvøldið var síðani hugnalig samvera fyri luttakararnar.

Útferð til Suðuroyar

Í apríl 1977 vóru 1.r-HF úr Hoydølum og 1.HF úr Klaksvík útferð til Suðuroyar saman við lærarunum, Johnny Thomsen og Hellen Heinesen úr Klaksvík og Gunvør Hoydal og Henriette Svenstrup úr Hoydølum.

Vit búðu á Gistingarhúsinum í Øravík frá fríggjakvøldi til sunnukvøld. Næmingarnir høvdu sjálvir keypt allan matin, og teir gjørdu hann til sjálvir.

Ferðin var sera vælegnað, og serstakliga var tað hugnaligt at koma saman við HF-næmingunum í Suðuroy, soleiðis at næmingar úr øllum trimum HF-deildum vóru saman og kundu práta um ymist.

Frá Suðuroyar HF-deild vóru lærararnir, Jóannes Dalsgaard, Uffe Grøn, Lis Helmer Larsen og Jens Hæstrup við, og av næmingunum vóru teir flestu luttakararnir úr 2. HF.

Av tí at næmingarnir sjálvir høvdu keypt inn og skipað so væl fyri, var ferðin sera ódýr, 110 kr. pr. næming. Av hesum var 16 kr. fyri mat í 2 dagar við øllum máltíðunum, 42 kr. fyri koyring (vit leigaðu bussar og koyrdu runt alla Suðuroynna), og 52 kr. fyri gisting og leigu av køki í Øravík. Næmingarnir skuldu sjálvir gjalda 50 kr., og 60 kr. hevur skúlin goldið fyri hvønn.

Frá Suðuroyar-ferðini 1.r HF úr Hoydølum og 1.HF úr Klaksvík

Á útferð í Hvannhaga

Næmingar rudda køkin

Frá Hvannhaga

Í gistingarhúsinum í Øravík

Frá Suðuroya-ferðini saman við næmingum og lærarum úr Suðuroyar HF-deild.



Unn, Johnny, Jóannes, Adrian og onnur

Hellen og Lissi

Gunvør, Johnny og Henriette



Næmingar úr HF úr Klaksvík, Suðuroy og Hoydølum hugna sær á HF-skúlanum í Vági.

FLATMYND AV FØ STUDENTASKÚLA



RINGITÍÐIR

1. tími	7^{50}	-	8^{35}
2. -	8^{45}	-	9^{30}
3. -	9^{40}	-	10^{25}
4. -	10^{35}	-	11^{20}
5. -	11^{30}	-	12^{15}
dögurði	12^{15}	-	12^{55}
6. tími	12^{55}	-	13^{40}
7. -	13^{50}	-	14^{35}
8. -	14^{45}	-	15^{30}